# Sambandið føroyinga og útlendinga millum

*Hugleiðingar um viðurskiftini frá 1273 til 1856.*

*H. D. Joensen.*

Hann, ið gera vil sjúkdómssøguligar kanningar Føroyum viðvíkjandi, noyðist fyrst at útvega sær so haldgott yvirlit, sum til ber, bæði um samband føroyinga við útheimin frá elstu tíðum og um sambandið oyggja og bygda millum. Annars verður hann altíð at standa trilvandi. Ikki bara, har tað snýr seg um smittandi ígerðarsjúkur, men eisini um t. d. matarhald, trot- og brennivínssjúkur.

Henda ritgerð er ein roynd til í stuttum at bera fram slíkt yvirlit fyrra setninginum viðvíkjandi frá teirri tíðini, tá ið føroyingar sjálvir vanliga verða hildnir at hava givist við at sigla, og til fríhandilin kom. Hon er minni enn so fullfíggjað. Tí á annan bógvin er heimildartilfarið so rúgvumikið, at tað kemst ikki upp fyri at handfara alt í stuttum yvirliti. Og á hin bógvin tykjast ikki allar atkomandi heimildir vera viðgjørdar av søgumonnum okkara ella, ið hvussu er, ikki at vera troyttar til fulnar. Eyðvitað tí, at kanningar teirra eru ikki gjørdar við serligum atliti at heilsustandinum. At til eru nógv enn heilt ókend (ella lítið troytt) heimildarrit í skjalasøvnum víða um — og eisini heima hjá okkum sjálvum — kunnu øll helst vera samd um (smb. t. d. ta heilt broyttu myndina av Hansa-veldinum í Noregi, tá ið *Schreiner* (1941) ikki leit undangongumonnum sínum ov væl til, men sjálvur av nýggjum leitaði eftir og kannaði tilfarið í ymiskum skjalasøvnum, har heimildarrit kundu hugsast at vera. Ella alt tað nógva, ið *J. F. West* (1970, 1970-76) hevur funnið við miðvísum leitingum, ikki um at tala tað nógva og sera forvitnisliga, sum komið er í tí frálíka tíðarritinum *Mondli).*

At hann, ið hetta skrivar, hevur dittað sær inn á øki, har hann er ikki serkønur og tí helst kann hava misskilt okkurt, vónar hann, at søgumenn okkara fara at fyrigeva, finnast at og rætta. Tí fyrstani tá kann verða bøtt um ta heldur kámu mynd, vit í løtuni í nógvum førum eiga av farnum tíðum. Serliga miðøldini viðvíkjandi, har lítið rivaði í, áðrenn *Sverri Dahl* og næstumenn hansara fóru til verka.

Støðið undir hesum yvirliti er bara í undantaksførum heimildarritini sjálv. Og tá verða tey altíð nevnd. Annars havi eg litið á tær prentaðu útgávurnar av heimildarritum, ið komnar eru (t. d. *Joensen* 1953, 1958), ella tað, ið kønir menn úr heimildunum hava drigið saman í prentað, søgulig bókaverk (*Andersen* 1895, *Degn* 1929, 1945, *Jakobsen* 1912, *Joensen, Mortensen & Petersen* 1955, *Nolsøe* 1955, *Pagel* 1965, *Petersen* 1974, *Ræstad* 1912, *Schreiner* 1941 og *Zachariasen* 1959-61). Har ið full semja er um viðurskiftini, verða hesi bókaverk ikki nevnd. Men verður okkurt serligt viðgjørt, ella víkja áskoðanirnar hvør frá aðrari, verður gjørt vart við tað. Mistøk, ið hesir høvundar við hvørt tykjast hava gjørt, havi eg loyvt mær at rætta. Berar sagnir eru ikki nýttar uttan í rárum undantaksførum.

Evnið er skipað í bólkar eftir sambindingarliðunum, og hvør bólkur aftur skipaður í tíðarrøð. Roynt verður ikki at taka upp í saman.

### *Handilssambandið — loyvd sigling.*

Ómetaliga fløkt tykist tað — ið hvussu er honum, sum leikmaður er á hesum øki — at fáa skil á handli og siglingarsambandi í 13.-15. øld. Vanlig hugsan tykist vera tann, at longu í 12. øld var torført hjá føroyingum at uppihalda siglingini, og frá seinru helvt av 13. øld megnaðu teir ikki longur sjálvir hesa sigling til grannalond. At norski kongurin í 1273 lovaði, at tvey skip skuldu ganga millum Noregs og Føroya verður vanliga skilt so, at føroyingar tá góvust við allari sigling um høv og tóku hana ikki uppaftur fyrr enn í 1805. Men so var valla.

Tiltikna røða Sverra kongs í 1186 bendir ikki á niðurgongd í føroyskari sigling. Norðmenn sjálvir vóru ikki ov væl fyrikomnir tá (*Schreiner* 1941). Korn treyt teimum, og handilin við Ongland og Danmark munaði ov lítið. Tað var megin-atvoldin í, at norðurtýsku býirnir við Eystrasalt, ið kundu útvega óavmarkaðar

nøgdir av korni, fingu fótin fyri seg í Noregi. Afturfyri lótu norðmenn turran fisk, ið teir høvdu ivaleyst av, síðani útróðurin við útnyrðingsstrondina hevði vundið so nógv upp á seg síðani 1100-talið. Longu tá vóru norðmenn ikki førir fyri sjálvir at uppihalda uttanríkishandli sínum. Seinast í 1240-árunum biður norski kongurin Lübeck um á vanligan hátt at senda skip síni við teimum vørum, ið Noregi tørvaði, t. e. korn og malt.

Í 1273 vóru Føroyar longu norskt skattland og høvdu ivaleyst upprunaliga frítt ferðasamband við Noreg. Vóru í hesum ein fastur lutur av móðurlandinum. Einki kongligt loyvi kravdist til, at maður kundi føra vøru úr Noregi til Føroya ella úr Føroyum til Noregs. Kongsvaldið kendi helst eina vissa skyldu til, at oyggjarnar fingu ta vøru, teimum tørvaði, og at tær eisini sluppu av við vørur sínar. Og tað miðaði eftir, at handilin mest møguliga gekk um Noreg. Fremmand lond kundu *ikki* reka slíkan handil uttan loyvi.

At Bjørgvin tá kom at verða miðdepilin eisini í føroyskum handli stóðst ikki av tí, at hesin handil fyri Bjørgvin hevði so stóran týdning. Turrur fiskur sigst ikki vera nevndur sum føroysk útflutningsvøra tíðliga í miðøld. Og tí vórðu Føroyar ikki lagdar undir umfermingarrættindi Bjørgvinjar, ið mest bygdu á fisk. Men tað stóðst av tí, at ríkisinntøkurnar úr Føroyum skuldu fara um Bjørgvin, at Bjørgvin lá Føroyum nærri enn nakar annar norskur keypstaður, at Bjørgvin var størsti keypstaður í Noregi, og umframt vóru skyldskapar- og onnur bond millum føroyingar og fólkið á Gulatingsleiðini. Tað vóru eini framíhjárættindi, ið føroyingar høvdu, at fara til Bjørgvinjar uttan serloyvi.

Einki tykist (enn) vera til skjals um, at norska ríkið fyrstu tíðina sjálvt fyri egna rokning røkti hetta siglingarsamband. Tvørturímóti tykist ferðasambandið landanna millum leingi at hava verið loyvt øllum norskum borgarum. Men ið hvussu er frá 1361 tykjast norsku keypmenninir í Bjørgvin at hava havt framíhjárættindi í Føroya-handlinum, eins og Bjørgvin tá í royndum verður hildin vera umskipingarhavnin burturav eisini fyri Føroyar.

Miðstøðan í øllum norskum uttanríkishandli var — ella kom ið hvussu er sera skjótt at verða — Bjørgvin. Og nakað fyri hetta mundið hevði tann longu tá hálvtannað hundrað ára gamla samgongan av norðurtýskum keypmonnum í útlondum, sum við Lübeck á odda í miðjuni av 14. øld kom at fáa heitið »*Hansa*«,[1] otað seg inn í Bjørgvin. Umframt við hesar týskarar, sum — eftir uppafturtiknum forboðum at døma — longu tá handlaðu við føroyingar, ætla søgumenn, at samband eisini hevur verið við bretsku oyggjarnar. Hansa-menninir í Bjørgvin fingu í 1361 somu handilsrættindi sum innlendu keypmenninir har. Tá høvdu teir longu, so teir skuldu standa seg betur móti norskum valdi, í 1343 gjørt sær fast handilssetur við goymsluhúsum har, tað so nevnda »kantórið«. Og meginparturin av øllum handilsskapi í Norður- og Vesturnoregi varð nú komandi 200 árini verandi á týskum hondum.

Á allan hátt og ofta við ógvisligum tiltøkum royndu Hansa-menn um aldamótið 1400 at forða eingilskmonnum í Noregs-siglingini, sum at siga helt heilt uppat um miðjuna á 15. øld. Í staðin fyri fóru bretar í 1408 ella 1409 at sigla til Íslands.

Fiskiskapurin undir Bretlandi hevði sligið frá. Teir noyddust at leita longri til havs og funnu fram á grunnarnar undir Íslandi, har gilt var av fiski. (Helst er tað ikki óhugsandi, at teir samstundis eru farnir at royna undir Føroyum ella, ið hvussu er, hava borið við her). Í 1490 boðaði kongur frá, at einki longur skuldi vera til hindurs fyri bretsku Íslandssiglingini. Og sama ár (1490) gav hann hálendingum[2] somu rættindi bæði í Íslandi og Hetlandi (*Schreiner* nevnir í hesum sambandi einki um rættindi í Føroyum), har forboð higartil hevði verið. Longu í 1430 høvdu hálendingar verið á hesum leiðum, tó valla nógvir í Íslandi. Í Bjørgvinjar-handlinum høvdu hálendingar lítlan týdning í 15. øld.

Samstundis við at eingilskmenn stutt eftir 1400 fóru at sigla til Íslands, fóru teir vestaru býirnir í Hansa-samgonguni undir at handla við norsku skattlondini vesturi í havi. Rættindi, sum bara kantórið í Bjørgvin segði seg at eiga. Í 1416 klagaði tað tí til »Hansa-dagin« um ta sigling, sum einstakir menn í samgonguni vóru farnir undir til Orknoya, Hetlands og Føroya. Og »Hansa-dagurin« samtykti harða revsing av teimum, ið hetta gjørdu. Hald skuldi leggjast á skip og førning teirra, og teir skuldu missa Hansa-rættindi síni. Hann legði dýran við, at Bjørgvin var einasti loyvdi miðdepil í fiskahandlinum. Forboðið rein ikki á, hóast fleiri ferðir uppafturtikið. Og í 1470-árunum fóru menn í Hamborg at gera út skip til Íslands og fingu loyvi til tess frá Kristiani kongi I. Norska ríkisráðið mótmælti harðliga hesi sigling til skattlondini, sum teir kravdu at verða steðgaða. Tí eingin — søgdu teir — hevði røkt og havt rætt til hesa sigling uttan »menn úr Bjørgvin«.

Av stórum áhuga hjá okkum er tað, at *Schreiner* sigur grundgevingar ríkisráðsins í hesum mótmæli at vera heilt skeivar. Tí fiskur úr Íslandi var tá í fleiri mansaldrar ikki fluttur til Bjørgvinjar. Men øðrvísi var við vørum úr hinum vesturhavsoyggjunum. Tær vóru komnar og komu tá enn til Bjørgvinjar og høvdu alstóran týdning. So stóran, at í 1501 verður sagt, at komu ikki hesar vørur úr Føroyum og Hetlandi (vaðmal, ull, smør og tálg — *Pederssøn* (1858) leggur í 1567 Føroyum viðvíkjandi aftrat skinn, fjøður og góðan ráskornan fisk, sum føroyingar fiska á útróðri), so fór vørutrot at verða í Noregi. Her man vera nóg so nógv avgjørt. Men ríkisráðið norska og kantórið í Bjørgvin, ið annars sjáldan sótu um sátt, vóru heilt samd í hesum. Forvitnisligast av øllum er kortini at frætta, at Bjørgvinjar-menn sjálvir fluttu *ikki* hesar vørur til Bjørgvinjar, men *føroyingar og hetlendingar sjálvir*. Hetta gjørdu teir, ið hvussu er, eftir miðjuna á 14. øld og ivaleyst nógv longri aftur í tíðina. *Schreiner* heldur tað vera ivasamt, um Bjørgvinjar-menn *sjálvir* upprunaliga sigldu landanna millum — í hesum er hann ikki samdur við

*Ræstad* (1912). Um miðjuna á 15. øld vóru teir ið hvussu er langt síðani trokaðir burtur úr hesi sigling og givnir við henni. *Oyggjaskeggjarnir sjálvir vóru tað, ið vørurnar fluttu.* Og teir vóru, tíverri, skuldabundnir at kantórinum í Bjørgvin heilt á sama hátt sum fólkið í Norðurnoregi. Teir seldu til kantórið, keyptu frá kantórinum og vórðu gjørdir út frá kantórinum. Eisini *Bruns* (1900) sigur, at føroyingar sjálvir høvdu beinleiðis samband — t. e. sigldu — við Hansamenninar í Bjørgvin. Sjálvir sigldu hesir keypmenn ikki. Teir ansaðu væl eftir ikki at bróta nakað siglingarbann í norska ríkinum. Eisini vita vit, at bæði hetlendingar og orknoyingar (har søgan frá hesi tíð er uppaftur meira kám enn okkara) sjálvir sigldu meira til Bjørvinjar enn Bjørgvinjar-menn til teirra eftir 1468 enn fyri hetta ár, tá ið teir vórðu settir í veð til Skotlands.

Tí var tað, at kantórið toldi ikki, at aðrir — heldur ikki skip úr Hansa-samgonguni sjálvari — skuldu fáa handilssamband við Føroyar, Orknoyar og Hetland. Sektin lá á Íslandi. Men viðvíkjandi hinum Vesturhavsoyggjunum bar ikki til at slaka. Úrslitið var, at Hansa-samgongan í 1489 gjørdi av, at gavst Hamborg ikki við sigling síni, skuldu allir limirnir í samgonguni hava loyvi til Íslands-sigling og handil har. Henda kúvending teirra — tí Hamborg gavst ikki — var ivaleyst atvoldin í, at kongur í 1490 gav bæði eingilskmonnum og hálendingum sama loyvi. Men hóast hetta helt stjórnin fyri Hansasamgonguna framvegis fast um forboðið fyri at sigla til Føroya, Hetlands og Orknoya. Ferð eftir ferð varð hetta forboð tikið uppaftur. Men tað gjørdi ikki mun. Handilin helt fram ótarnaður av øllum forboðum. So statt komu tað ikki at verða Hansa-keypmenninir í Bjørgvin, ið fingu framíhjárættindi í skattlandahandlinum. Men hesin handil kom móti endanum á 15. øld undir týskar keypmenn í Hamborg (og Bremen). Ið hvussu er gremur Bjørgvin seg í 1506 um, at keypmenninir har eru trokaðir burtur úr handilsskapinum við Hetland, Føroyar og Orknoyar av hesum báðum býunum. Føroyahandilin liggur frá 1524—29 *formliga* undir Bjørgvinjar-fútanum, frá 1529—53 undir Hamborgar-keypmanninum Thomas Koppen.

Men føroyingar sigla enn. Bispurin í Kirkjubø sendi í 1533 sjálvur skip til Noregs við farmi av vaðmali, fjøður og øðrum føroyskum vørum.

Nær man siglingin tá vera steðgað? Nakað vist vita vit ikki enn. Men nevnt má verða tað, ið vit vita.

Í 1545, tá ið Kristian kongur III beyð báðum teimum stríðandi pørtunum í Bjørgvinjar-handlinum (umboðsmonnum fyri Bjørgvinjar-handilin øðrumegin, andstøðumonnum teirra og norðmonnum hinumegin) til semingsfundar í Odense, enda norðmenn og hinir andstøðumenn handilsins ábreiðslur sínar við at kasta kantórinum fyri tað ólíkliga beistalevnað, sum fram fór á Bryggjuni. Bannið fyri, at starvsmenn við kantórið sluppu at giftast, so leingi teir arbeiddu í Bjørgvin, bar við sær eitt skøkjulevnað, sum týskurin hevði ikki tolað heima hjá sær sjálvum. Mótparturin svaraði aftur, at eisini honum var hetta ónæriliga lívið hart ímóti. Men tað lá heilt undir valdi norsku myndugleikanna at forða fyri, at unglingar sluppu at reka hetta ósømiliga levnað. Tað gjørdist best við at hindra *skipum úr Hetlandi og Føroyum* í at flyta so nógv slettut (»løsaktige«) konufólk við sær til Bjørgvinjar. *Schreiner* vísir eisini í hesum sambandi á skjal frá miðjuni á 16. øld, ið sigur, at skipini úr Hetlandi vanliga førdu við sær »arbetzdrenge og piger«, sum fyri ein part vóru »tienstløse«. *Pagel* (1965) málber seg um hetta sama við at siga tað vera manna søgn, at úr nógvum ymiskum landspørtum í Noregi, enntá úr Føroyum, komu heil skip við skøkjum til Bjørgvinjar[3]. Yvirhøvur var um hetta mundið og eitt sindur seinri »ein heil útbygd av Føroyum í Bergen« (sum *Jacobsen* 1952 tekur til í ritgerð síni um Liber Bergensis Capituli, dagbók Absalons Pederssøn fyri tíðarskeiðið 1552—72). Men um føroyingar ella hetlendingar sjálvir áttu skipini verður ikki sagt.

Alla 16. øld út er handilin nú miðsavnaður hjá einstøkum handhavarum, annaðhvørt býum ella meir og minni einstaklinga feløgum. Hóast Hansa-veldið í 16. øld varð bast í Noregi, og norski handilin so líðandi aftur kom í hendurnar á norðmonnum, so fótaðu norsku keypmenninir í Bjørgvin sær ongantíð ræfttiliga aftur í handlinum við Føroyar. Í 1553 fáa danir og norðmenn fríari ræsur, 1556-69 er handilin beinleiðis undir kongi. Absalon Pederssøn skrivar í 1564, at h. 1. marts »drage kongens skib, det islandske oc feriske her i fraa« og 10. apríl 1567 »kom ind feriske skibet« (tey upprunaligu tvey skipini, sum føroyingum vóru lovað 300 ár harfyri vóru nú bara

eitt). Í kongsbrævi frá 1569 er tilskilað, at føroyingar eftir gomlum siði eiga rættindi til at senda eitt ella tvey skip til Noregs eftir viði. (Eisini um hetta veit Absalon Pederssøn at siga, tá ið hann h. 29. marts 1571 nevnir, at »Des imellom skulle de Feriske bruge it skib oc føre timber i landit oc saa møgit, at huer kan holde sig medt i sit huus, men inted føre til forsprang«). Hetta ár (1569) kemur handilin undir borgarar í Keypmannahavn. Í 1571 stendur føroyingum í boði at halda so nógv skip, sum teir vildu, og teir stóðu til 1573 sjálvir fyri handlinum, kundu flyta neyðsynjarvørur sínar inn, hvaðani teir vildu, og selja framleiðslu sína, hagar teir vildu. Hildið verður, at hetta gekst illa. Og handilin varð aftur latin Hamborg til 1579. Tá fekk Magnus Heinason handilsrættindini (og rætt til at manna vápnað skip), eitt skifti saman við øðrum. Í 1586 koma rættindini undir Hamborg og Keypmannahavn, í 1597 verða tey latin fýra Bjørgvinjar-borgarum, í 1614 tveimum borgarum í Bjørgvin og fútanum í Føroyum. Til 1619 er tað mesta av út- og innflutningi, ja, av øllum sambandi yvirhøvur farið um Bjørgvin.[4]

Men tá broytist alt hetta í grund. Føroya-handilin kemur í december 1619 undir »Det islandske, færøske og nordlandske Kompagni« við sæti í Keypmannahavn. Frá 1620 verður miðdepilin fyri øllum *lógligum* Føroya-handli Keypmannahavn. Aftan á »kompaníið« kom Gabla-tíðin 1662-1709. So, frá 1709 fer ríkið sjálvt undir at reka handilin fyri egna rokning, og kongligur einahandil burturav stendur við til 1856. Sambandið við Noreg slitnaði. Alt kom at ganga um Keypmannahavn. Hví og hvussu hetta hendi, skal ikki verða ætlað um her — hóast tann spurningurin helst er tann áhugaverdasti í allari søgu okkara.

Siglingin hjá føroyingum man helst so líðandi vera burtur deyð og heilt hildin uppat í seinru helvt á 16. øld.

Kongligu handilsskipini sigldu — sum veðrið var til — frá seinast í marts til seinast í november. Ferðin tók við hesum seglskipum eina til tvær vikur, men kundi sjálvandi við hvørt taka nógv, nógv longri tíð. Skipini vóru ymisk til støddar, frá 75 upp í 150 reg.tons. Talið á teinum kundu vera tilsamans upp í fimm, og hvørt skipið sigldi einar 4-5 ferðir aftur og fram um árið. Í 1750 komu skip bara 4 ferðir, u. l. 1850 tilsamans 12-16 ferðir, t. e. í miðal 2 skip um

mánaðin teir mánaðir, tey sigldu (*Den kgl. enehandel på Færøerne 1709-1855*).

Men umframt hetta lógliga handilssamband hava verið nógvir aðrir sambindingarliðir.

*Sjórænarar.*

Teir spøkja uppi í nógvum gomlum frásøgnum, men líkt er til, at nakað nógv er avgjørt. *Claussøn Friis* (1881) nevnir í frásøgn sínari, sum Føroyum viðvíkjandi er skrivað longu í 1592, at sjórænarar eru føroyingum til miklan skaða, men at fólk flýggja niðan í fjøllini, so nakað samband millum teir og føroyingar man vera ivasamt. *Andersen* (1895) metir, at ein atvoldin í, at føroyingum gekst so illa við egnum handli fyrst í 1570-unum, mundu vera sjórænarar, eins og teir gjørdu, at Magnus Heinason fekk loyvi til at manna vápnað skip.

Hvørki í bók síni um Noreg 1567-1570 ella í Liber Bergensis Capituli tykist *Absalon Pederssøn* (1858, 1860) við einum orði at nevna sjórænarar ella, at Jens Riber rýmdi undan teimum, hóast hann fleiri ferðir hevur hendan mann á orði. Hann sigur bara: »som var kaldet derfra og til Stavanger«. Tá ið *Lucas Debes* (1673) hundrað ár seinri skrivar, at sjórænarar, bæði »franske, iriske og engelske«, íðuliga hava gjørt seg inn á føroyingar, er helst ov nógv avgjørt. Tá ið saman um kemur, er um sjórænarar burturav ikki stórt søguligt um at halda uttan álopið á handilin í Tinganesi í 1579 (skotin Klerck), at Jørgen Dåe hongdi sjórænarar í Vestmanna í 1615 og turkaálopið í Hvalba. *Andersen* (1895) nevnir, at høvuðsmenninir á skipum Dåes skuldu forða bæði fremmandum fiskimonnum og sjórænarum í kongsins sjógvi, bæði turkum, írum, skotum, fransum og dunkerquearum, sum vóru nógvir rundan um Føroyar fyrst í 17. øld. Kendast er sjálvandi turkaálopið í Hvalba í 1629 (tvey stór skip við 500 monnum úr Algier), har teir rændu, drópu og fóru avstað við 30 fólkum, sum ongantíð spurdust afturíaftur. At teir neyðtóku konufólk er ikki nevnt, men at teir skóru bróstini av eini konu (*Jakobsen* 1925). Í søgnunum um Hargarbrøðurnar og Jansaguttarnar verður sagt frá írum[5] (í seinru søgnini verða eisini nevnd fransaskip). Hetta má — miða vit okkum eftir *Jakobsen* (1904) og *Degn* (1945) — helst hava hent u. l. 1600 (smbr. *Enni* 1979). *Zachariasen* (1959-61) metir sjórænararnar við Føroyar at minka eftir 1630. Tó sæst eingilskur kapari[6] at hava søkt eingilskt skip á Hvalba í 1643, hálendskt skip kemur í 1662 inn á Havnina undan portugisiskum kapara, og í 1667 eltir írskur kapari tvey hálendsk skip, ið eisini leita sær skjól á Havnini (*Beenhakker* 1979). Annað skipið fekk tó bót. So kanska hava »sjórænarar« og »kaparar« verið nýttir til undanførslu, tá ið sakarmál tóku seg upp. Í 1677 gjørdu fransar landgongd í Havn, rændu og brendu.

*Fremmandir fiskimenn.*

Frammanfyri er nevnt, at bretar fyrst í 15. øld fóru at fiska undir Íslandi, og at teir tá kanska hava borið við í Føroyum. Søguliga (*Zachariasen* 1959-61) vita vit um, ið hvussu er, skotskan fiskiskap undir Føroyum í seinru helvt av 16. øld, og um aldamótið 1600 vóru onglendingar uppií.

Fransar og bretar skuldu tá hava tann vana, at teir á leið til Íslands løgdu at í Føroyum og tóku fólk umborð at arbeiða »sum trælir« á skipum sínum og settu tey á land aftur á heimleið. Suðuroyarprestur sigst (seinast í 16. øld) hava verið ein, ið onglendingar tóku. »Noyðingin« og »trælir« eiga helst at verða skild í linara lagi. Tí, man tað hava verið stórt øðrvísi enn í dag, har fremmand fiskiskip seta inn eftir fólki? Sambandið við føroyingar var so gerandisligt, at teir kendu nøvnini á skipunum og á skiparunum við. Hesir fiskimenn verða í 1615 (í eini klagu til kongs) sagdir at vera friðardýr og sjálvir at vera fyri álopum av sjórænarum, sum eisini leggja at landi og herja. Einki sæst tó til, at hesir fiskimenn tá hava gjørt seg inn á fólk. Føroyingum tókti mest at siga synd í hesum fremmandu fiskimonnunum. Men klagan endar tó við (eins og aðrar klagur um hetta mundið), at bretsku skipini (og hálendingar vóru eisini) naskast ov nógv uppi á føroysku fiskimiðunum, ja, heilt inni á fjørðunum. Tí árini beint eftir 1600 vóru stak góð fiskiár. Skotskir fiskimenn tykjast hava verið nógvir á Havnini fyri 1618, tá ið forboð kom.

Um hvussu inniligt sambandið hevur verið, eisini málsliga, og um hvussu lívið hevur háttað sær í Havnini tá, fáa vit meira enn varhuga av úr tingbókini (*Joensen* 1953, 81.-82. bls.). Hetta er sakarmál frá 1618 og lýsir sera væl, hvussu nær ið summi konufólk í Havnini komu teimum fremmandu sjómonnunum.

Ein arbeiðskona (Lisabett) gremur seg illa um, at ein onnur genta (Wendell), jóladag á kvøldi hevði bæði sligið hana og drigið hana eftir hárinum út gjøgnum dyrnar í »hellige boud« og kalla hana »Schodtzke Rijlle och Skodtzke flagh med flere onnde naffne« ... Wendell sigur Lisabett hava kallað seg ein tjóvsunga og eina »Baadzmandz hore« og brigdað henni »pendinge och Dallere, som honn haffde bortt druckenn med enn Baadzmand och borrth Daabelett« ... Prógv fekkst fyri, at ein »Baadzmannd aff Clauws fleckes skiff ...« heystið fyri á náttartíð varð funnin nakin í seingini hjá Wendell, har tey høvdu stongt seg inni. — Seinri verður í dóminum skrivað »Rylle« og »baadz mandz hore« og álagt Wendell, at hon fyri sín ringa munn og sítt slettuta levnað skal fara úr Havnini og aftur hagar, ið hon er fødd og frá komin. (Eftir *Zachariassen* 1959-61 var hon ættað av Toftum). — At orðini *flagh* og *rijlle (rylle)* eru skotsk, man lítið vera at ivast í, og merkja tey[7] ávikavist eitt lubbut, bulvirkisligt, ótrivaligt konufólk og ein klombrut flogsa. Hvørki fyrra ella seinra orðið, sum tykjast hava verið væl kend í Havn tá, vóru tí mikið ærulig.

»Baadzmandzhore« hevði tá á døgum ikki neyva merking um eina, ið helt seg

til teir frægaru undirmenninar á skipum. Hevur tá havt merkingina »hvønnsmannsteys«, við tað at *bådsmand* tá bara merkti ein av manningini.[8] Hetta orðið gongur aftur fleiri ferðir í heimildarritum og verður tí nevnt her.

Genturnar báðar ruku saman í »hellige boud«. *Andersen* (1895) metir hesi hús (»hellige bod«) at hava verið eitt pútuhús — har varð »drukkið, og leys konufólk hildu til har«. Kanska eigur í hesum sambandi at verða nevnt, at *Zachariasen* (1959-61) nevnir tað forboð, ið tingskrivarin (sum Ólavsøkudag 1645 varð dømdur úr starvi) hevði sett leysum konufólki fyri at hava tilhald í Havn. Tá ið Zachariasen týðir »have deres værelser« við »at leiga sær verilsi« í Havn, fer hann hendingaferð skeivur. »Værelse« tá á døgum merkti bara tilhaldsstað.[9] Men tað broytir einki í ætlanini við forboðnum — at forða »gentum av bygd ... (sum) royndu at fáa sær innivist í Havn fyri har at kunna hitta fremmandar menn, sum við handilsskipunum komu av havinum«.

Eftir 1618 vitjaðu fremmandir fiskimenn meira inn í øðrum bygdum. Vissa er fyri, at hálendingar hava fiskað undir Føroyum í 1670. Annars fóru teir víðari fram undir Ísland at fiska, men handlaðu kortini á leiðini við føroyingar (*Beenhakker* 1979). Í 18. øld leggur Nederland meira og meira dent á toskafiskiskapin undir Íslandi, og á ferðunum til Íslands bera hálendingar við Føroyar tíðliga á vári.

1776-77 royndi »Handils- og fiskivinnustovnurin í Altona« við ríkisstudningi eftir sild og toski undir Íslandi, Føroyum og Hetlandi. Føroyingar vóru við teimum. Tá ið hvalvíkingar í 1791 søkja um at fáa eitt skip at fiska við undir Føroyum, nevna teir, at teir í nógv ár hava verið saman við eingilskum fiskimonnum og lært av teimum, sum — siga teir — eru teir einastu, ið hava roynt langt úr landi. Hesi skip hava nýtt føroyskar loðsar til at vinna upp trygga havn. Í 1770-unum sigast týsk skip at hava kent várleiðirnar bæði norðan og vestan fyri Føroyar (*Hansen* 1960). Í 1844 verður í reglugerðini til skiparan á skipi hjá donsku fiskiroyndunum undir Føroyum sagt, at hann gjølla skal eygleiða tey fronsku fiskiskipini undir Føroyum og royna at læra av hesum fremmandu fiskimonnum. Um leið 1850 høvdu hetlendingar stóran fiskiskap undir Føroyum. Fleiri føroyingar sigldu tá við teimum og skotum — og hildu á við at gera tað alla 19. øld út (og gera tað summir enn). Amtmaðurin skrivar í 1850,

at hvørt einasta ár eru at síggja fleiri hundrað fremmand skip undir Føroyum, fronsk, belgisk og bretsk, ið liggja har frá tíðliga á vári og langt út á heystið. *Schrøter* sigur í 1847 (*Corresp. J. H. Schr. a. o. 1831-65*), at hann — seinastu árini, hann var í Suðuroy (hann var har 1797-1828) — óttaðist fyri, at kynslig smitta skuldi verða borin inn á oynna av teimum nógvu fronsku fiskimonnunum, ið leitaðu inn har.

Í hesum sambandi kann eisini verða nevnd *stórhvalaveiðan*, har baskar byrjaðu longu í 11. øld og, tá ið hvalurin minkaði um teirra leiðir, søktu hann víðari við Noregs, Íslands og Grønlands strendur. Tá vóru eisini bretar og hálendingar, men eisini menn úr Norðurlondum (ofta saman við baskum) uppií. Hvussu stór stórhvalaveiðan hevur verið við Føroyar í gamlari tíð, dugi eg ongar frágreiðingar at finna um. Men valla hevur hon havt nógv upp á seg. Líta vit á *Mikkjal á Ryggi* (1927) — og hann er vanur at vera stak álítandi — so sveimaði í gomlum døgum hvalurin íðuliga uttan um bátarnar, so teir máttu rógva undan. Sjálvir veiddu føroyingar ikki stórhval, men teimum dámdi í fyrstuni væl, tá ið norðmenn í 1894 fóru at skjóta hann undir Føroyum. Fremmand veiða fyrr hevur tí valla verið munandi. Longu í 1616 gremur Kristian kongur IV seg um, at hálendskir hvalastingarar vitja Føroyar og fara upp á land har (*Beenhakker* 1979). Hvussu nógv samband, ið verið hevur teirra og føroyinga millum, tykist óvist. Skipini vóru stór, 3-400 tons, og 40-50 menn vóru við hvørjum. At teir eins og fiskiskipini hava hálað vatn man vera eyðsæð. Í 1652 sigur ein genta úr Suðuroy seg at vera neyðtikna í haganum av manni av hvalastingara. Sjálvandi kann hetta vera undanførsla til at bera í bøtuflaka fyri annan mann, ið kann hava barnað hana. Men valla hevði nyttað at sagt tað í rættinum, vóru ikki líkindi til, at tað kundi vera hent.

### *Loynihandil.*

Sum *Zachariasen* (1959-61) tekur til, gingu í kjalarvørrinum á allari sjóvinnu í Norðuratlantshavi umframt »sjórán« eisini loynihandil. Men slíkur handil varð sjálvandi — hóast hann fleiri ferðir er nevndur í skjølunum — duldur sum mansmorð, at tey, sum høvdu verið uppií, skuldu ikki koma fyri rættin og fáa harða revsing. Bara heilt lítið skuldi t. d. til at missa festið. Ikki uttan illa vildi til (øvund, hevnisøka o. t.), komu málini upp, og hendingarnar vórðu festar á blað.

Fyri vist vita vit t. d., at skip úr Hamborg (sum tá ikki hevði handilin í hondum) handlaði víða um í Føroyum í 1580. Heilt opinlýst tykist hesin handil hava farið fram um 1620, tá ið landsins fremstu menn (løgmaður, løgrættumenn

og prestar) gingu á odda, samstundis við at smámenn og húskallar ferðaðust oyggj úr oyggj og bygd úr bygd við loynivørum, mest bjóri og brennivíni. Handilsskipini, ið henda loynihandil framdu, tykjast tá hava verið ensk og skotsk. Og tey vóru so væl kend av fólki, at ikki stóðst á ferð eftir ferð á tingi at fáa uppspurt bæði talið á skipum og nøvnini á skiparunum, ið sigldu oyggjanna millum. Summir teirra tykjast hava verið sera væl kendir við føroyingar, ein teirra so væl, at hann læt son sín vera eftir í Føroyum, til hann kom aftur árið eftir. Skipini hildu seg (ið hvussu er aftan á 1618) frá Havnini, men leitaðu upp góðar úthavnir, eitt nú Funningsfjørð (har dómur frá 1623 prógvar, at bretsk skip ofta hava verið), Hvannasund og norðuri í Vági. (At so góð skipahavn sum Trongisvágsfjørður eisini, og helst í stórum, hevur verið uppi í loynihandlinum fyrst í 1600-árunum verður nevnt beint niðanfyri). Um somu tíð (u. l. 1620) og nakað seinri síggjast hálendingar at hava handlað bæði við prestar, sýslumenn og løgrættumenn vesturi í Vágum og í Suðuroy. Í brævi frá rentumeistaranum (dagf. 17. apríl 1620) eru strong boð um, at føroyingar frá tí degi ongan mugu handla við uttan »Det islandske kompagni«, hvørki onglendingar, hálendingar, skotar, týskarar, danir, norðmenn ella nakran annan og hvørki á landi ella á sjógvi. Lítið man hava hjálpt. Í 1631 vórðu hosur avreiddar til enskt skip, »ið lá útfyri«. Stórt enskt búreisingaskip á leið til Nýggja Ongland í Ameriku lá í 1637 fýra dagar inni í Vágum og handlaði og fór haðani til Vestmanna, har tað lá heila viku. Lagt verður við, at hetta skipið gjørdi einki ilt. Í 1646 verður sagt frá, at Norðoya sýslumaður hevur verið umborð hjá bæði bretskum og hálendskum skiparum, teir drukku og fóru í land í Gerðum.

Tvey brøv eru frá 1647. Annað frá løgmanni, har hann, at siga sum javnlíki, beinleiðis sigur kongi frá, at sambandi við fremmand skip slepst ikki undan. Ikki ber til at reka tey aftur til havs í illveðri, ella tá ið tey hava mist reiðskap, krevja umvælingar, vilja hála vatn o. s. frv. At eitt lítið av handli fer fram tá, er bara rímiligt báðar vegir. Eru menn ikki lagaligir, kann tað skjótt elva til illstøðu. Hitt brævið er frá prestunum, har teir undirbrotliga og við nógvum gremjingum bera fram undanførslur fyri loynihandilin við hálendingar og bretar. *Zachariasen* (1959-61) man hava allan rættin, tá ið hann vísir á, hvussu stóran týdning loynihandilin hevur havt fyri føroyingar, sum gjøgnum hann sluppu av við vrakvørur sínar. Og hvussu ilt tað er hjá okkum nú at skilja millum loynihandil og fremmandan fiskiskap (og aðra sjóvinnu) á annan bógvin og beinleiðis álop á hin bógvin. Illstøða kundi, sum løgmaður so sinniliga tekur til í áðurnevnda brævi sínum, skjótt taka seg upp, lagaðu partarnir seg ikki hvør eftir øðrum.

*Beenhakker* (1979, 1980) hevur fyri stuttum roynt at draga saman tað søguliga tilfar, ið er um hálendingar í Føroyum (tað sagnkenda tilfarið, ið *Hoekema* 1974 hevur greitt frá, viðger hann ikki), bæði frá fiskiskapi, handli, loynihandli, smuglan og skipbroti. Úrslit hansara er, at regluligt samband kom ikki fyrr enn fyrst í 17. øld og var fyri tað mesta ólógligt. Tá eru undan tiknar tær mongu handilsferðirnar, ið hálendsk skip gjørdu fyri teir keypmenn, ið tann lógliga

handilin høvdu í hondum. Tí hesir keypmenn nýttu altíð stórt tal av hálendskum handilsskipum til at føra føroysku vørurnar til ríkið ella beinleiðis til Hálands at selja. Og upp í hesa sigling heldur Beenhakker teir hava blandað loynihandil, sum skjótt vant upp á seg. Beinleiðis heimildir sigur hann ikki at vera fyrr enn í 1646 (tá ið handilin síðan 1620 eina tíð hevði ligið undir Keypmannahavn, og »Det islandske kompagni« í 1652 hevði fingið rætt at taka skip við egnum herskipi (*Andersen* 1895)). Men síðani eru alla seinru helvt av 17. og fyrru helvt av 18. øld mest at siga regluligt samband. Ofta eru fleiri skip árliga og ofta ár undan ári. Sum áður nevnt er at minnast til, at føroyskar heimildir siga bara frá tílíkum málum, tá ið ikki longur bar til at dylja tey. Hald varð fleiri ferðir lagt á skip, og t. d. norðoyingar, suðuroyingar, sandoyingar og skúvoyingar komu illa fyri — nógv sakarmál vóru.

At so góð skipahavn sum Trongisvágsfjørður hevur verið uppi í loynihandlinum fyrst í 1600-árunum, og tað helst í stórum, prógva kanningarnar hjá *Sverra Dahl* (1980).

Í 1952 rannsakaði hann toftina *á Krambatanga* í Líðini á Trongisvágsfirði, har søgnin segði hálendingar hava havt handil og møguliga goymsluhús, og har maður, ið skar torv, í bakkanum beint oman fyri Krambatanga, í 1913 hevði funnið Kristmynd skorna úr eikiviði, og sum tá av kønum monnum varð mett at vera »nederlendskt handverk frá 1600-árunum« (*Dahl* 1968). Sverri fann (*Dahl* 1980, úrslitini eru enn ikki kunngjørd) í toftunum av krambúðini »tigulsteinar av hálendskum slagi, t. e. gulir, smáir tigulsteinar (sonevndar »moppur«), blýkúlur, flintbitar og leirílatabrot. Eitt teirra, áhugavert í hesum viðfangi, var prýtt við forvitnisligari mansmynd ella rættari andliti av einum manni, og — vinstrumegin tað — 16, ið man vera árstal, men tíverri var høgrumegin brotnað so nær myndini, at um nakað tal hevur verið har, var tað burtur. Eftir talinum, sniðinum, glasingini og myndini man hetta vera ílat frá 1600-árunum og annaðhvørt hálendskt ella kanska enskt«. Sverri ger henda úrskurð: »Tað vóru hálendingar, sum høvdu loynigoymsluhús yviri á Krambatanga helst fyrst í 1600-árunum ella har um leið. Teir mega hava verið loynihandilsmenn, tó tað er ikki lætt at fata, at teir hava verið har við so miklari útgerð, uttan at nakð er viðmerkt um teir nakrar staðir«.

Vert man vera at nevna í sambandi við kanningar Dahls, at *Lucas Debes* (1673) skrivar: »Siden Trungesvaag (inderlig udi denne Fiord er en meget god liden Hafn/kaldet Punthafn; noch mellem en Holm oc det faste Land/huor mand kand binde Skibet fast med Landtow/ oc paa en Fiæl gaa aff Skibet paa Landet: Ellers er der ofver alt i Fiorden god Sommer-Hafn)«. Sum allir Tvørámenn vita, og, sum tað sæst á kortinum (M 47 í *Færøernes Kortlægning*, Geodætisk Instituts Publikationer VI. Kbhvn. 1944), er Punthavn (ella sum sagt verður: í Puntanum ella yviri í Puntanum) nakað eystari enn Krambúðin, vestari enn víkin Byrgishavn. Og Lítlhólmur liggur beint áraka Krambúðina.

Alla 17. øld vant hesin loynihandil upp á seg, og eisini *Andersen* (1895) hevur frá seinru helvt av 17. øld nógv dømi um fremmand skip, mest hálendingar, tí í Hálandi vórðu tær flestu ullvørurnar seldar. Kortini metir hann, at tingbøkurnar bara siga lítið frá øllum teimum fremmandu fiskimonnunum (helst hálendingum ella bretum), sum tá eru farnir í land úti um bygdirnar og hava stolið fra fólki tað, ið teimum tørvaði. Hann heldur tað bara vera eitt dømi av mongum, tá ið varðveitt er frágreiðing um álop á Trøllanes í 1686. — Annars verður í 1673 loyvt at handla við fremmandar, tá ið neyðsynjarvøra fekst ikki við handilin.

Hóast meting Andersens hava vit kortini meira enn ein illgruna um, at tað hevur bara verið sjáldsamt, at illstøða stóðst av hesum handilssambandi, heldur hevur tað verið tvørturímóti. *Beenhakker* (1979) nevnir kirkjuklokkuna á Eiði, ið var skrædnað, og sum í 1662 varð send við hálendskum skipi til Hálands at verða stoypt av nýggjum. Heilt ovfarin verða vit av at frætta sama høvund siga frá, at hálendingar í 1663 sendu skip við sjeymannanevnd til Føroya at kanna líkindini til at seta á stovn vevivirki. Og í 1664 kom ein maður aftrat í somu ørindum (úrslit kom tó einki burturúr). Og Andersen sjálvur sigur frá deyðadømdari gentu, sum í 1685 varð fingin umborð á eingilskt skip, sum eiðismenn bátsróðu út á Flógvan.

Frá 1686 er sakarmál um handil við hálendskt skip, ið lá á Vestmanna.

Ein prestakona og skyldkona hennara úr Kollafirði gingu til Vestmanna, fóru umborð á hálendingin og niðurundir við skiparanum. Stutt eftir rópti prestakonan ein mann (allarhelst ein føroying) niðurundir at fáa sær upp í pípuna at vita, um tubbakið var nóg gott. Hálendinginum læt hon hosur afturfyri. Sama ár var hon umborð á fýra fremmandum skipum ið lógu á Eiðisflógva og eina ferð úti fyri Haldórsvík, har hon keypti tubbak og franskt brennivín. Hetta vóru ikki eindømi. Aðrar prestakonur og eisini prestarnir sjálvir gjørdu tað sama og vóru umborð á hálendinginum. Í 1687 verður nevnt um tey nógvu — meginparturin av suðuroyingum teirra millum — ið handlað hava við hálendska skiparan. Í árunum 1689-1709 vóru fimm bretsk og hálendsk skip tikin fyri loynihandil — á Eiði, í Suðuroy, Funningi og Vágum. Sjálvandi bara nøkur fá av nógvum. *Beenhakker* (1979, 1980) sigur sakarmálini eftir 1700 at minka niður í at siga einki (tó heldur hann, at føroysku heimildarritini eru ov lítið troytt enn), hóast skipini komu regluliga, og summi lógu rættiliga leingi inni (t. d. í 1725 ikki færri enn tvey á Sørvági, tvey á Fuglafirði og í Funningi og tvey í Kollafirði, í 1726

tvey á Hvannasundi og tvey á Nesi, í 1729 fleiri, bæði á Fuglafirði og undir Skúvoynni — teirra millum ein hvalastingari — og eisini á Klaksvík og Sørvági). Í 1710 liggur ein hálendskur indiafari langt skifti norðuri við Streymin. *West* (1979) sigur frá, hvussu allir sýslumenn í 1740 vórðu stevndir til Havnar til at geva eiðsvorin svør loynihandlinum viðvíkjandi. Bara hálendskir hokarar,[10] eini 60 tons til støddar og við 12-16 monnum hvør, plaga at koma undir Føroyar at fiska og handla. Teir komu helst inn á Klaksvík, Hvannasund, Funnings- og Fuglafjørð, Sørvág, Sand, Trongisvágs- og Vágsfjørð. Lógu bert fáar dagar í hvørjum staði og handlaðu mest við tubbaki og brennivíni fyri hosur. Skipini broyttu navn havn úr havn, so tey kundu tykjast vera fleiri, enn tey vóru. Men, siga sýslumenninir, tey eru bara fá, og hetta árið hevur bara verið eitt skip. Árið eftir fór hálendskur hokari á land í Íslandi. Umborð vóru 7000 pør av føroyskum hosum! (Í 1770-unum verður útflutningurin av føroyskum hosum gjøgnum kongliga handilin mettur at hava ligið um 80.000 pør um árið (*Den kgl. enehandel på Færøerne 1709-1855*)). — Frá seinru helvt av 18. øld eru ongar frásagnir, men helst hava hálendsk skip regluliga vitjað Føroyar eisini hesi árini, tí Íslands-ferðirnar komu í hæddina um 1760. Í 1803 er hálendskt fiskiskip á Havnini, í 1814 ein hálendsk kuff,[11] ið rýmdi undan svenskum kapara. Annars minkaði hálendska Íslands-siglingin eftir 1806 burtur í einki, og sambandið við Føroyar var øldina út lítið. Tó fiskaðu enn í 1870 nøkur hálendsk skip undir Føroyum.

Loynihandilin hevur staðið við, til fríhandilin kom. Annaðhvørt munaðu tey tiltøk, ið gjørd vóru til at forða fyri honum, einki, ella embætismenninir í Føroyum hava av ringum royndum latið um seg fara (ella teir vóru, sum Løbner kommandantur, beinleiðis uppi í honum). So seint sum í 1826 skrivar amtmaðurin, tá ið hann ber í bøtuflaka fyri Jóhan Hendrik Weyhe, at handil við fremmandar fer fram í flestum bygdum í Føroyum, at ein nøgd av ullvøru á henda hátt verður flutt av landinum, og at enntá í Havn eru fleiri, mest at siga almennar, útsølur av bannaðum og innsmuglaðum vørum. Og alt hetta hendir, uttan at nakar talar at, tíansheldur verður ákærdur. Ein grundgevingin fyri at lata amtmannin fáa »Thorshavn« var, at hetta skip kanska kundi avmarka »tann støðugt vaksandi loynihandilin við fremmand skip ... norðmenn smæðast ikki fyri alment her á keypskálanum (Børsen) at tryggja skip og førningar til Føroya; vit hava eisini hoyrt borið upp á mál um føroyskar ullvørur, sum hálendskum skipum er loyvt uttan avgjald at flyta inn til Hálands« (bræv frá handilsstjórnini í 1824 til amtmannin). — So seint sum í 1844 verður sagt (í reglugerðini til skiparan á donsku fiskiroyndun-

um undir Føroyum), at tað er manningini strangliga bannað at handla við føroyingar. Og í 1848 leggur innanríkisráðið — tí at klippfiskur hevur verið seldur til norskt skip — eina við, at handil má ikki fara fram við fremmandar og tá serliga ikki við norðmenn. Her skal at enda bara verða nevnt, at enntá *loðsviðurskiftini* vóru so vorðin, at tey skuldu forða fyri sambandi við fremmandar (men sjálvandi eisini fyri smittandi sjúkum). Í 1851 mælir amtmaðurin til, at bara í Nólsoy verður skipað fyri rættiligum loðsverki, ið fer at vera nóg mikið fyri allar Føroyar.

So fast varð spent móti broddinum heilt upp ímóti endabrestinum.

*Sínámillumhandil.*

Innan fyri lógarinnar mark vórðu gjørd fleiri tiltøk — sum nevnd skulu verða seinri — ið bóru við sær nógv samband við útlendingar í seinru helvt av 18. og fyrru helvt av 19. øld. Danin *Ryberg* hevði 1768-88 goymslustøð í Havn til sínámillumhandil við Ongland og Ameriku (mest við brennivíni, tubakki og te). Umframt hevði hann tubbaksspinnarí, fekst við at fiska undir Føroyum og at virka klippfisk, ið hann við egnum skipum flutti til Eystrasalt, Spaniu og onnur Miðjarðarhavslond. Beinleiðis handil hevði hann ikki við føroyingar. Men har arbeiddu nógv havnarfólk, og nógv bygdafólk fluttu til Havnar at fáa arbeiði har. Umframt vóru heilt nógvir útlendingar í tænastu hansara. Teir høvdu samkomuhús (klubba) í Quillingsgarði og keyluvøll úti á Rundingi. Summi ár komu upp í hálvt hundrað skip við ella eftir vøru til hesa frígoymslu. Sambandið millum føroyingar og alt hetta útlendska fólkið, bæði av landi og av sjógvi, hevur verið nógv.

*Herskip.*

Ymiskar royndir hava sjálvandi verið gjørdar frá gamlari tíð til at forða fyri bæði sjórænarum, loynihandilsmonnum og nøskum, fremmandum fiskimonnum. Herskip úr dansk-norska ríkinum vóru tí ikki sjáldsamir gestir, bæði størri og smærri, ið hvussu er frá stutt eftir 1600. Ferðirnar hjá Jørgen Dåe í 1615 (við tveimum skipum) og í 1616 (við seks skipum, har kortini bara tey fýra vóru inni í Føroyum, tá ið tey hildu undan illveðrinum í Íslandi) eru mest kendar. Hann var inni á fleiri støðum (t. d. Hvalba og Vestmanna).

Jón Ólafsson, indiafari (*Ólafsson* 1905), greiðir frá ferðini í 1616, at teir dvaldust í Føroyum í hálvan mánað. Fyrst lógu teir inni á Kaldbaksfirði, men eru síðani helst farnir inn á Skálafjørð. Tí teir vóru hjá Mikkjali í Lamba í eini rimmarveitslu, ið stóð í ikki minni enn fýra samdøgur við alskyns góðgæti og góðum mati, tónleiki við øllum sløgum av ljóðførum og føroyskum dansi, og har Mikkjal skonkti trý sløg av mjøði og níggju sløg av ymiskum bjóri. Eisini vóru teir í drykkjuveitslu hjá eini einkju og høvdu 14 ára gamla son hennara við sær til Danmarkar at tæna. 22 av manningini vóru ringir av skyrbjóg, tá ið teir komu til Føroya. Teir vóru allir hýstir inni hjá bónda, ið æt Olaf (Ólavur Lavarsson á Skála), og allir uttan ein sluppu undan. Eisini eigur at verða nevnt, at Jørgen Dåe til skipsvistir sínar kravdi ein drápsseyð frá hvørjum bónda í landinum. Og teir møttu allir gleðiliga og vóru bodnir umborð til gestaboð, ið stóð í fýra dagar. Sumt í frágreiðingini kann vera skrøgg, men hon sigur okkurt um, at fremmandir hermenn vóru ikki altíð illa líddir.

— Av og á vóru vaktarskip við oyggjarnar. Løgtingið takkar í 1615 kongi fyri verjuskipið »Gabriel«. »Det islandske kompagni« fekk í 1652 rætt til at halda vápnað skip. Chr. von Gabel helt eftir 1655 javnan skip undir Føroyum at verja handilin (eitt teirra var »Justitia«). *Andersen* (1895) metir, at um miðjuna á 17. øld hava donsk-norsk herskip verið í íslendskum og føroyskum sjógvi at siga hvørt einasta ár. — Í juni 1675 kom danskur eysturindiufari á heimferð frá Java á Havnina, har hann lá í ein mánað. Umborð vóru bara einir 20 menn livandi eftir av teimum 154, ið verið høvdu við. Hinir vóru deyðir á ferðini. Nógv samband var við land, teir fingu einar 54 føroyingar úr øllum oyggjum at hjálpa sær at fáa skipið aftur til Keypmannahavnar (»lyfti um eina ávísa hýru og fría heimferð fyri teir, ið ikki ynsktu at verða verandi í Danmark« (Mondul 1980, *Cortemünde*)). — Fr. von Gabel skipaði í 1698 fyri, at vaktarskip skuldi vera alt árið við Føroyar. Kortini var tað bara eitt tíggjumannafar, sum fyrrverandi konstápul á Skansanum (Niels Zachariasen á Eiði) var formaður á. Helst mannað við føroyingum hevur tað so havt samband við fremmand skip. — Á sumri 1740 leitar danska herskipið »Blå Heyren« eftir loynihandilsskipum undir Føroyum (*West* 1979).

Fremmand herskip bóru eisini ofta við oyggjarnar, serliga í bardagatíðum. Í 1667 róku 11 hálendsk skip á heimferð úr Eysturindiu norður til Føroya (og Íslands), har eitt fór á land, hini komu á Hvalba og síðani til Havnar. Í 1672 lá hálendski flotin (24 herskip)

úti fyri Havnini, og annars leitaðu í fransk-hálendska krígnum (1675-79) nógv hálendsk skip, ið verið høvdu í langfarasigling handan høv inn undir Føroyar at spyrja tíðindi (*Andersen* 1895). Í 1675 var fult av fronskum kaparum rundan um Føroyar, í 1677 lógu fýra fronsk herskip út fyri Nólsoy, har manningin var í landi. Og sama ár rændu fransar í Havn og inni á Nesi. Eisini eigur at verða nevnt, at í 1687 vóru til verju umborð á kurlendskum handilsskipi, ið kom við viði úr Noregi til handilin í Havn, men sum skipaði viðin upp á Glyvrum, fleiri hermenn, ið struku runt um oyggjarnar frá september og árið út.

Meðan vit nema við flota- og hermál, má *Havnar skansi* verða nevndur. Stóri skansin varð bygdur u. l. 1580 (Magnus Heinason), Lítli skansin á Tinganesi (sum ongantíð tykist hava havt nakran týdning) eftir 1630 (óttin aftan á turkaálopið í Hvalba). Bæði hesi stórarbeiðini verða mett at hava drigið nógv fólk av bygd til Havnar, har tey hava arbeitt undir og saman við fremmandum (*Zachariasen* 1959-61). Um manningina á Skansanum vita vit í 1709, at hon var 35, 30 soldátar, tríggir korporálar, ein konstápul og ein bartskeri. Soldátarnir vóru ymstaðni úr Føroyum, men flestu »yvirmenninir« vóru helst útlendingar. Teir komu og fóru, og hetta helt á langt inn í 19. øld (bæði sersjantar og konstáplar). Tá ið Gabel í 1658 sendi galiot[12] sína úr Amsterdam til Føroya, vóru 8 ella 16 hálendskir hermenn við til at verja Skansan. Hægsti yvirmaðurin var tá altíð útlendingur. Og hvørki hann ella hinir fremmandu við Skansan munnu altíð hava — sum *Andersen* (1895) tekur til — livað »noget meget regelmæssigt liv«. Stjúkdóttir Lucasar Debes varð barnað av Claus Becker, kommandanti.

Tætt hava donsku herskipini undir Føroyum valla verið í 18. øld. Vanliga lá tað á kommandantinum á Skansanum við tíggjumannafari at ansa eftir loynihandilsskipum. Men tað gekst teimum illa. Tí fremmandu skipini sigast at hava verið vápnað, so skansabáturin við hvørt mátti halda undan. Kommandanturin sigur í 1740, at bátur hansara kann ikki forða fyri loynihandlinum. Okkurt annað má tí setast í verk (*West* 1979). At manningin á skansabátinum javnan hevur verið umborð á fremmandum skipum undir Føroyum er ivaleyst.

Í sambandi við fremmand herskip noyðast vit heilt stutt at steðga á við 1808, tá ið bretska herskipið »Clio« tók Havnar skansa, og bretski kaparin von Hompesch (brillumaðurin) fleiri ferðir var á Havnini og rændi har. Um hin fyrra er váttað (av kommandanti og landfúta), at hvørgan dagin hann lá á Havnini, gjørdi nakar av manning hansara seg inn á nakað fólk. Har var strangur og harður agi, og tað lítla, teir fingu úr handlinum, varð goldið í hondina. Um von Hompesch verður fyrst sagt, at manning hansara (har umframt bretar eisini vóru danir og norðmenn) var atvold í »nogle små excesser og tyverier«. Men seinri at tvær vápnaðar bátsmanningar vóru settar í land um kvøldið og vóru har alla náttina, hersettu embætismannahúsini, har teir trokaðu seg inn í stovu, har konufólk lógu og svóvu. Manningin sigst hava verið uppøst, tí hon slapp ikki at ræna og leika í, sum hon vildi. Nakað beinleiðis um samband við konufólk verður ikki nevnt. Tó eigur ikki at verða gloymt, at Jákup Nolsøe, tá ið hann greiðir frá hendingi í handlinum, nevnir, at kommandanturin og handilsforvaltarin lótu bretum fínar hosur o. a., og at skiparin á skipinum hjá von Hompesch læt arbeiðskonuna (? — »Løbners pige Margrethe«) hjá kommandantinum fyri einki fáa tvey stykki av lørifti, sum hon bað hann um. »Sera vinarliga fór tí alt fram millum embætismenn okkara og fíggindan« endar Jákup Nolsøe, sum kortini ikki var nakar embætismannavinur — tá, ið hvussu er. Mannamúgvan í Havn kærdi seg um embætismenninar fyri ovastanum á »Clio«. Hetta bendir alt tann vegin, at vit fáa ein illgruna um, at minni enn einki hava manningarnar á hesum fremmandu skipunum og Havnar fólk ikki átt saman. Eisini síggjast skipini at hava fingið góðar upplýsingar um viðurskiftini í Havn aðrastaðni í Føroyum, t. d. frá miðvingum og presti í Norðuroyum, áðrenn tey løgdu inn á Havnina.

Løbner skrivar annars í 1808, at oyggjarnar eru heilt kringsettar av reikarum (»krydsere«), sum eisini vóru inni á Havnarvág. Í 1810 og 1811 kom fleiri ferðir bretsk skonnart (ið hevði verið inni í Suðuroy eftir loðsi) á Havnina við matvørum, tubbaki, brennivíni og øðrum (tí »Jubelfesten« var tikin í Leith).

### *Føroyingar í langfarasigling.*

Vit hava frammanfyri loyvt okkum at ivast í, at føroyingar skulu ikki hava dugað at fáast við størri skip og at sigla burtur í onnur lond frá u. l. aldamótinum 1300 og úteftir. Eisini tí er tað neyðugt at fregnast eftir tí, ið er at finna um føroyingar í langfarasigling.

Um miðjuna á 16. øld vita vit um føroyskan skipara (Niels Helgason), ið við egnum skipi mest sigldi millum Noreg og býirnar fram við Eystrasalti, og sum av og á var í Føroyum og hevði ferðafólk við (sí eisini *Jacobsen* 1952). Heilt óhugsandi er tað ikki, at onkrir føroyingar hava silgt við honum. Miðstøð hansara

var Bjørgvin, har hann gjørdist borgari í 1559, ráðmaður í 1586 og doyði 1609.[13] Magnus Heinason (føddur u. l. 1545), ið sum ungur fór at sigla úr Bjørgvin, sigldi fyrst millum Bjørgvinjar og Føroya, var so í hálendskari tænastu, kom aftur til Noregs í 1578 og átti sjálvur skip. Til hann varð hálshøgdur í 1589, reikaði hann víða um, bæði í Noregi, Danmark og Hálandi. Var fleiri ferðir í Føroyum. At føroyingar hava siglt við honum, er meira enn hugsandi. *Østvedt* (1969), ið hevur roynt at draga saman tað, ið vitað er um Magnus Heinason, skrivar: »Væl kann tað vera, at M.H. við harðari hond reinskaði havið fyri stjórænarar, men manning hansara skikkaði sær so, at bæði føroyingar og norðmenn bóðu Harran varðveita seg fyri hesum vinmonnum. Tá ið hann so onkuntíð støðaðist eitt skifti á heimoyggjum sínum, var eingin tryggur fyri lívi og ognum. Leysasøgur gingu um oyggjarnar um, hvussu hann og manning hansara fóru fram við hørðum, og um siðloysi teirra. Í full trý ár hildu teir til á Skálafjørði. Sjálvur búði Magnus hjá hálvbróður sínum Jóni løgmanni — í Lamba. Tjúgu av monnum hansara vóru vaktarmenn um borð á skipinum, meðan hinir vórðu hýstir á gørðum í grannalagnum. Teir høvdu jól og góðar dagar: bardagi, drykkjuskapur og ólevnaður. Eingin kendi seg tryggan, og søgnin sigur, at ikki færri enn trý hundrað børn løgdu Magnus og menn hansara eftir seg« — hvørjum álítandi heimildum Østvedt so hevur hetta frá?

Tá ið Kristian kongur IV í 1606 sendi fimm rannsóknarskip til Grønlands, var føroyingur (Guttormur) skipari á einum teirra. Annar føroyingar (Líggjas Tormóðsson), ið sum ungur hevði verið siglingarmaður, var stýrimaður á kongligum herskipi úr Føroyum til Íslands og aftur til Bjørgvinjar at njósnast eftir sjórænarum u. l. 1620. Sonur harra Klæmints á Sandi fór sum ungur út at sigla um miðjuna á 17. øld og var burtur í eini 27 ár, áðrenn hann kom aftur at búgva í Føroyum u. l. 1682. Hann verður nevndur eysturindiufari. *Beenhakker* (1980) heldur, at — eftir nøvnunum at døma — vóru kanska føroyingar við hálendskum handilsskipi, ið kom til Føroya í 1675. Um sorinskrivarasonurin úr Havn (Sørin Mortensen Hoyvík), ið gjørdist kommandantur á Skansanum í 1721, hevur verið í langfarasigling, sæst ikki. Men hann var í árunum 1710-20 við donskum herskipum. Bróðir hansara (Mortan) var nógv ár í hálendskari tænastu í Eysturindiu, til hann kom aftur til Føroya at búgva í 1725. — Um Nólsoyar-Páll er óneyðugt at nevna annað her uttan tað, at hann um 20 ára aldur fór út at sigla, fyrst við skipi hjá Rybergs handli, síðan við kongliga handilsins skipum, men frá u. l. 1791-92 í langfarasigling — hildið verður bæði við fronskum og bretskum skipum, og at hava verið sera víða, umframt í Danmark, Noregi og Svøríki, bæði í Fraklandi, Onglandi, Vesturindiu og Ameriku sum stýrimaður og skipari. Tá ið hann í 1805 við »Royndini Fríðu« fer við koli til Bjørgvinjar, og til hann í 1808 gekk burtur, var manning hansara at siga bara føroyingar og var við honum í Bjørgvin, Kristiansand, Flekkerø og Keypmannahavn. Í 1807 hevði hann føroyskar útsendingar við, tá ið teir umvegis Noreg fóru til Keypmannahavnar og haðan til Kiel. — Sonur Nólsoyar Páls sló út í Biscayavíkini í 1820-árunum. Hann var við sama skipi sum nólsoyingurin Jógvan í Liða, sum fyrst ið hann var

komin til mans (helst u. l. 1815-20) fór út at sigla og sigst hava siglt víða. Hann sigst umframt Danmark at hava vitjað bæði Grønland og Suðurameriku og kom ikki heimaftur fyrr enn á ellisárum. Av øðrum nólsoyingum um somu tíð kunnu nevnast Tummas í Geil, ið var burturi í fleiri ár. Summir sigldu eitt skifti við kongliga handils skipunum og fóru síðan í langfarasigling sum porkerningurin Suðuroyar-Dánjal (føddur í 1787), ið sigldi bæði upp á Miðjarðarhavslond og Eystur- og Vesturindiu, tók stýrimansprógv í útlondum og endaði aftur í Føroyum. Nakað ta somu siglingarlagnu hevði søldfirðingurin Jóhan Hendrik Weyhe (føddur í 1786). Javnaldri hansara, Mikkjal Müller úr Hvalba, fór um aldamótið 1800 og var burtur í tjúgu ár, tók stýrimansprógv í 1807, og førdi til 1814 ymisk kaparaskip, mest í Eystrasalti. Hann var í 1819 yvirstýrimaður á Vesturindiufara og kom (ógiftur) heim aftur í 1826 at búgva í Havn. Beiggin Christopher mynstraði í 1810 við bretskari skonnart, ið komin var á Havnina, sigldi víða, men búsettist í Danmark. Sonur Jákups Nolsøe (Andrias Niklái) sigldi úti. Seinast, ið frættist frá honum, var í 1825, tá ið hann fór úr franskari Miðjarðarhavshavn við donskum skipi, ið spurdist ikki aftur. Eisini tríggir abbasynir Jákups vóru í langfarasigling. Petur Hans Sivertsen, ið førdi Eiðis-jaktina (»Neptunus«), var á ungum árum farin út at sigla, tók stýrimansprógv í Altona, førdi fleiri donsk skip og var seinri við enskum Eysturindiu-fararum. Ein eiðismaður av »Neptunus« fór í 1850 av í Keypmannahavn og sigldi burturi við donskum skipi.

Øll hesi dømi frá miðjuni á 16. til miðjuna á 19. øld benda á, at hetta hevur verið lagið hjá so mongum føroyingi til allar tíðir. Vit eiga bert einki skrivligt um teir, tí eru teir bara at finna, tá ið teir hava borið við galdandi lógarreglur, hava søkt um skip ella eru uppi í sakarmálum um arv, skifti o. t. Teir hava eins og flestir langfaramenn nú á døgum verið sáttligir, stak dugandi skilamenn, sum uttan háva úti í heimi hava verið Føroyum gott umboð. Menn, ið gjørdu ikki hol í sjógv sum Magnus Heinason og Nólsoyar-Páll, og sum tí eru gloymdir.

## *Skipbrot.*

So mikið hevur hent seg aðrastaðni í heimi, at ring smitta hevur staðist av *skipbrotsmonnum*, at vit heilt stutt skulu nevna nøkur dømi um slíkar tilburðir í Føroyum. Har hava ivaleyst verið mangir, ið vit skrivliga einki vita um.

*Zachariasen* (1959-61) sigur tað vera søgn, at eitt turkaskip rendi á land á Sumbiarhólmi (í 1627?). Ein maður kom sær upp á hólmin og varð verandi fýra ár í Sumba, har hann legði eftir seg leysingarson, sum seinri fór norðurum at búgva. — Í 1662 fór hálendskt skip illa undir Føroyum, varð umvælt og vann

aftur til Hálands (*Beenhakker* 1979). Í 1667 fer annar hálendingur (»Walcheren«) ein ódnardag í september á land á Skiphellu, stutt norðan fyri Breiðá við Kvívík. Hann hevði saman við tveimum øðrum, stórum hálendskum skipum leitað inn í Vestmannasund at kroka, men vann ikki upp havn sum hini bæði. Um borð á øðrum hinum var hálendski varaadmirálurin, ið sendi bát at bjarga (*Beenhakker* 1979, *Ravnsfjall* 1979). Ógreitt er, hvussu nógv fólk ið var um borð á »Walcheren«, tá ið hann fór á land. Men á útferðini til Eysturindiu vóru ikki færri enn 75 hermenn og 195 sjómenn umframt tríggjar kvinnur og børn. Heilt nógv druknaðu, tá ið skipið fórst (lík vóru fiskað upp, og klæðini drigin av einum). Hvussu nógv, ið sluppu undan, verður einki sagt um. Men søgnin um, at kvívíkingar skulu hava steinað í hel øll, sum komu livandi á land, man ikki vera álítandi. Nógv av tí dýra farminum rakst millum oyggjarnar, partar av vrakinum heilt til Mykines og Hvalbiar. Fólk um meginpartin av landinum høvdu samband við bjargingina og hálendingarnar av hinum báðum skipunum, sum steðgaðu leingi í Føroyum. — Undir sakarmálinum varð ført fram, at eisini árini fyri hevði nógvur reki verið millum oyggjarnar. — Í 1674 sigldi skip úr Amsterdam á *náttartíð við fullum seglum á land undir* Nólsoynni. Skipið varð vrak, men væl gekst at bjarga farminum (*Beenhakker* 1979). Í 1702 gekk danska skipið »Island« burtur undir Føroyum á leið úr Keypmannahavn til Cadiz í Spanialandi. Teir vunnu í báti til lands á Viðoynni, men áðrenn teir vórðu funnir, vóru teir *fýra* deyðir úti, *sjey* livdu eftir. Teir komu til Hvannasunds og vórðu hýstir ymsastaðni í grannalagnum (*Niclasen* 1924).

*Jacobsen* (1969) hevur skrivað sera áhugaverda grein um, tá ið »Westerbech« fór á land undir Kirvi í 1742. Við vóru 91 menn, teirra millum hermenn á *heimferð* úr Bataviu. Teir 80 *komu sær niðan á slætt,* lógu *nátt í* Vági. *Haðani* til Hvalbiar, har teir sama dag vórðu skjútsaðir til Sands, haðani fóru summir til Skálavíkar. Í tíggju dagar vóru teir í Sandoynni, komu so til Havnar, har sjálvandi ikki var húsarúmd til so nógvar menn. Tí vórðu teir sendir út á bygd. Fimm vikur aftan á at teir vóru farnir á land, fóru tíggju til Danmarkar við handilsskipi, hinir vórðu verandi allan veturin, í meira enn níggju mánaðir. Tá var bara bartskerin eftir, sum søgur ganga frá. — Um leið 1750 rendi eitt skip úr Írlandi á land í Mykinesi, manningin slapp í bátin, róði út úr briminum og rak inn á Saxun, har teir vóru leiddir til húsa og nutu allan blíðskap. Seinri komu teir til Havnar og gistu í ymiskum húsum (*Niclasen* 1924). Sami høvundur sigur frá norskum skipi, ið um sama mundið fór á land á Sandoynni. Allir sjólótust uttan stýrimaðurin. — Á heysti 1811 fórst norska galeasan, »Håkallen«, illa millum Ísland og Føroyar, men mannskaði var eingin. Hon varð sleipað inn á Kaldbaksfjørð, og manningin varð verandi í Føroyum til tíðliga á sumri árið eftir. Ein teirra tykist tó hava búsett seg í Suðuroy (*Nolsøe* 1955). Sami høvundur greiðir frá, hvussu Pól á Miðgerði í 1820 saman við soninum Poul Johannes á Økrum bjargaði sjey monnum av sluppini »Emmu« úr Dunkerque, ið var farin á land sunnanfyri Akrar. Og hvussu Suðuroyar-Dánjal í 1822 bjargar fimm monnum av norsku briggini »Den Kjække«, sum mastraleys kom rekandi gjøgnum Vest-

mannasund og fórst í briminum norðan fyri Kvívík. — Schrøter skrivar í 1824 til *Forchhammer* (1927), at teir í Hovi hava funnið nógv vrak, ið vísti, at danska skipið »Lilla Gusta« var sokkið á ferð úr Archangel til Livorno. Trý lík vórðu funnin og potað niður í kirkjugarðin í klæðunum við nøkrum fjalum uttanum. Schrøter ivast ikki í, at ið hvussu er tveir av monnunum hava bara verið skindeyðir, og gremur seg um, at fólk skal ikki hava góðar leiðbeiningar í lívging. Í hesum sambandi skal verða lagt aftrat, at *Jørgensen* (1902), sum seinast í 19. øld gjørdi mannfrøðiligar kanningar av suðuroyingum, sigur seg ikki hava kannað beinagrindir, tí at hann eftir tí, ið hann hevur fingið uppspurt, mátti ivast í, hvørji tjóð hin grivni var av. »Á flestum kirkjugørðum her um leiðir, serliga í fjørðum, har skip leggja inn, eru grivnir ikki fáir sjómenn úr øllum tjóðum, og tí kennir tú teg ongantíð tryggan«.

Skipini kundu gera um seg, hóast tey vóru mannleys, tí at ofta kom nógv fólk saman at bjarga og at keypa av førninginum. Í 1828 rak mannleyst skip á land í Saksun. Orsakað av teirri stóru mannamúgvu, sum har kom saman til uppboðssøluna av vørum, breiddi eitt herviligt beinkrím, ið var byrjað í Havn, seg út um alt landið (*Graba* 1828, *Rasmussen* 1959).

*Føroyingar ferðast.*

Eyðvitað er ikki nógv goymt um tað, hugsa vit um stuttleikaferðir og um at vitja ætt, kenningar og vinfólk. Áður er nevnt um tann nógva ungdóm, ið sigst hava leitað til Bjørgvinjar um miðjuna á 16. øld. Eisini vita vit um, at Guttormur løgmaður doyði í Bjørgvin í 1571 á heimferð úr Keypmannahavn við Nielsi Helgasyni (smb. *Jacobsen* 1952). Sum *Zachariasen* (1959-61) ger vart við, síggja vit vanliga í 16. øld kong, tá ið hann leigar burtur handilsrættindini, leggja tær treytir við, at føroyingar skulu sleppa at ferðast aftur og fram við skipunum hjá teimum, sum handilin hava í hondum, hóast ørindi teirra vóru at bera fram klagu um handilin. Men um aldamótið 1600 tykjast føroyingar so líðandi at gerast meira heftir. Fyri 1620 finna vit javnan fólk, ið ferðast til Bjørgvinjar. Eftir 1620 lá leiðin altíð til Keypmannahavnar. Í 17. øld bendust viðurskiftini tann vegin, at føroyingar sluppu ikki út at ferðast uttan loyvi. Hetta bandið kom at vera fullfíggjað í 1661 og stóð ikki bara við í Gablatíðini, men tykist at hava verið, til fríhandilin kom. Eingin umsókn ella klaga, tíansheldur nøkur sendinevnd, mátti fara av

landinum uttan í samráð við yvirvaldið — ta seinastu tíðina við amtmannin (*Nolsøe* 1955). At føroyingar kortini hava ferðast — uttan loyvi — við útlendskum skipum, man lítil ivingur vera í. Í 1631 fær funningsmaður bót, tí at hann var farin til Bretlands at vitja konubróður sín, sum búði har. Slíkt bar tó helst bara til hjá heldur ókendum fólkum. Lucasi Debes eydnaðist ikki í 1671 at sleppa av landinum við hálendskum skipi, sum lá á Havnarvág á leið til Hálands. Í 1698 er Niels Zachariasen av Eiði staddur í Keypmannahavn, tá ið hann verður formaður á vaktarskipinum »Justitia«. Tá ið Hvalvíkingar og skiparin Hansen søkja um skip í 1791, eru teir staddir í Keypmannahavn. Í 1806 fer Jákup í Toftum við Nólsoyar-Pálli at ferðast til Keypmannahavnar — hann sigur tað bara vera stuttleikaferð, har hann á hvørjum degi gekk og spákaði í býnum. Díðrikur á Skarvanesi — ein heilt ókendur 26 ára gamalur kollfirðingur — fer á sumri 1828 til Keypmannahavnar í ókendum ørindum (*Joensen* 1970). So meinbogarnir fyri at ferðast hava tá valla verið stórir, áttu fólk fyri farseðil og innivist. Í 1847 eru tveir Eiðismenn staddir í Keypmannahavn at keypa jaktina »Neptunus«. Og seinri (1852) hava teir á ferð til Hull ferðafólk við sær. Hetta eru bara dømi. Tættar hava ferðingarnar valla verið hjá vanligum fólki. (Men nógv høvdu vit fingið at vita um hetta, vórðu »Extract af udfærdigede Rejsepas ved Landfogden paa Færøe« miðvíst kannað. Mær vitandi er tílíkt arbeiði ongantíð gjørt).

*Fólkaflyting.*

Av stórum týdningi hevði tað verið at fingið gjørt sær eina mynd av, hvussu munandi innflytingin av fremmandum fólki til Føroya hevur verið frá elstu tíðum (her verður ikki hugsað um beinleiðis landnám). Men tað man vera torført og tykist enn ikki at vera gjørt. Her verður hugsað um fólk, sum higar komu í onkrum ørindum, fingu starv og annaðhvørt búsettust ella fóru av stað aftur, tá ið ein tíð var umliðin. Eisini er tað av týdningi at fáa ið hvussu er ein hóma av, hvussu nógv fólk úr Føroym eru flutt burtur (at læra, ganga í skúla, lesa ella tæna), langt ella stutt tíðarskeið, men sum eru afturkomin at búgva.

Fútar (og vetrarfútar), vita vit, ferðaðust á hvørjum ári. Teir vóru mest danskir, og løgdu, fleiri teirra, frillubørn eftir seg. Teir hægru menninir við handilin vóru

danir, norðmenn og týskarar — ofta gingu fútastørv og handilsskapur saman (*Zachariasen* 1959-61). Teir ferðaðust alla tíðina aftur og fram við skipum handilsins. Prestarnir komu aftan á trúbótina, teir allarflestu, úr Danmark (kirkjan varð beint eftir 1620 flutt undan Bjørgvinjar undir Sælands biskupsdømi). Teir komu og fóru. Men summir støðaðust, helst teir, ið fingu góðar giftur. So við og við vóru tað ofta presta- og embætismannasynir úr Føroyum, ið fóru niður at lesa og komu aftur.[14]

Um læknarnar — bartskerarnar og landkirurgarnar — kunnu vit so dánt siga (*Carøe* 1917), at av teimum 18, sum fingust við starvið frá 1584 og til fríhandilin kom, vóru bara teir tveir føroyingar. Av hinum vóru tríggir norðmenn, ein sweizari, ein úr Pommern, ein úr Schlesiu, ein tykist hava verið týskari og níggju danir. Heldur ikki teir tykjast altíð hava livað »noget meget regelmæssigt liv«.

Útlendskar ættir, ið áttu jørð í Føroyum ella høvdu onnur áhugamál at røkja, frætta vit um longu í 16. øld. Tær komu sjálvar ella sendu umboðsmenn. Stutt eftir 1600 koma undan kavi fremmand nøvn, eitt nú á donskum harramannaættum — ivaleyst leysingabørn, sum teir vitjandi hava lagt eftir seg (*Zachariasen* 1959-61).

Samgiftur vita vit um sera nógvar longu frá 1500-talinum. Bæði fólk, gift til Føroya (fyrst úr Noregi (Bjørgvin), seinri mest úr Danmark), og føroyingar, bæði mannfólk og konufólk, gift burtur í onnur lond longu tá, til Noregs, Danmarkar, men eisini til Onglands. Her er at minnast til, at vanliga frætta vit bara um slíkt, tá ið sakarmál hava verið, mest um arv. Trongt mark var fyri, hvussu nær ið hjún kundu vera skyld, og var hetta ein atvoldin í, at útlendingar, sum vórðu hildnir vera nakað (t. d. prestar), gingu so skjótt inn í tær mest múgvandi føroysku ættirnar. Ættarbondini teirra millum vóru tí longu nógv í 16. og 17. øld (*Zachariasen* 1959-61).

Føroyingar, ið tænt hava úti og eru afturkomnir, eru nevndir ymsastaðni. Lítil ivi man vera í, at ein partur av teimum nógvu konufólkunum, sum sigast vera farin til Bjørgvinjar í fyrra parti av 16. øld, er afturkomin. Og var tað sum í Hetlandi, hava mannfólk verið uppií. Helst hevur tað verið sum nú, tá ið ungfólk fara burtur at tæna. Stutt eftir 1600 vita vit um ungan mann, sum fór at tæna hjá góðum fólkum í Danmark og fleiri ár seinri kom heim aftur at búgva. Í 1616 hevði Jørgen Dåe úr bygd inni á Skálafirði við sær niður til Danmarkar 14 ára gamlan drong, sum fór at tæna í Danmark, og sum seinri gjørdist stórur maður í Íslandi (sí frammanfyri). *Wolff* (1651) nevnir í bók síni (sum fyri ein part, ið hvussu er, tykist vera uppafturtøka av Claussøn Friis), at føroyingar komu ofta væl fyri og fingu góð størv, tá ið teir komu til Danmarkar.

Um beinleiðis skúlagongd vita vit (*Jacobsen* 1952, *Øssursson* 1963), at Eyðun Andrasson (seinri próstur í Føroyum) gekk í skúla í Bjørgvin um miðjuna á 16. øld. Mikkjal í Lamba gekk í skúla í Bjørgvin u. l. 1580-85, og eisini sonur hansara (við seinru konuni) gekk í skúla har u. l. 1635. Sonur Suðuroyarprest gekk í skúla í Bjørgvin og fór í 1619 haðani at lesa til prest í Keypmannahavn. Gingu ungir føroyingar javnan í skúla í Bjørgvin fyri 1620, so kom leiðin eftir hetta

ár altíð at liggja um Keypmannahavn (*Zachariassen* 1959-61). Tora vit at líta á, at yvirlitið hjá *Øssurssyni* (1935) er toluliga fullfíggjað, hava frá 1592 fimm studentar verið fyri 1620, bara ein teirra er tó merktur at hava tikið prógv í Bjørgvin. Síðani hava 17. øld út 14 føroyingar tikið studentsprógv, ein í Bjørgvin, ein í Helsingør, tríggir í Havn, men teir níggju í Keypmannahavn. Úr 18. øld eru 31 (eingin frá 1769-90), ein í Slagelse, tveir í Sorø, tríggir í Roskilde, seks í Keypmannahavn, níggju í Helsingør og tíggju í Havn (teirra millum J. C. Svabo og Nic. Mohr, ið báðir hildu fram at lesa). Í 19. øld til 1856 vóru bara tilsamans átta føroyskir studentar — ein í Rønne, ein í Vordingborg, ein í Helsingør og fimm í Keypmannahavn. At latínskúlin í Havn var dottin niður fyri, hevur gjørt stóran mun. Frá 1792-1835 vóru bara tveir føroyskir studentar. Síðani komu teir toluliga regluliga.

Eisini um handverkarar er eitt sindur at finna. Stutt eftir 1600 er nevndur ein gullsmiður (Jákup, ið seinri gjørdist sorinskrivari). Annaðhvørt hann var føroyingur ella ikki, má hann hava lært uttanlands (um ikki gullsmiður bara var eykanavn). Í 1616 nevnir Jón indiafari, at Ólavur Lavarsson á Skála, ið var kønur í øllum jarnsmíði, hevði lært handaverk sítt í Tróndheimi. — Fyrsta, ið nevnt er um kol í Føroyum, er í 1626 (*Rasmussen & Noe-Nygård* 1969). Í 1733 verður danskt skip sent til Føroya við eingilskmanni, sum setur á í Oyrnafjalli, men tað datt niðurfyri longu árið eftir. Í 1760-unum ferðaðust runt í Føroyum tveir útlendskir kolamenn. Teir settu á í Hvalba og høvdu nakrar tunnur av koli við sær aftur til Keypmannahavnar. Í 1777 kemur aftur útlendingur at leita og hevur við sær í 1778 tveir menn úr Kongsberg. Roynt verður í nøkur ár, og fleiri útlendskir kolamenn tykjast ikki hava verið uttan ein námkønur maður — »bjergkandidat Kruuse«. *Svabo* (1959) sigur, at u. l. 1780 varð kolið til útflutnings annaðhvørt flutt beinleiðis úr Hvalba við handilsins skipum til Keypmannahavnar ella úr Havn, hagar tað fyrst varð flutt av skotskum skiparum. Í 1804 gavst ríkið við hesum royndum, og síðani varð kol bara høgt til húsarhald. — Í 1786 kom Per bøkjari úr Danmark til Rybergs handil. 1768-88 arbeiddu nógvir útlendingar við sama handil. Í 1815 fer við »Færøe« maður av Toftum. Hann varð settur av í Noregi og gjørdist seinri skraddari í Havn. Um leið 1840 fer sýslumanssonurin Joh. Mich. Müller til Danmarkar at læra til bøkjara. Seinri fór hann til Hetlands at læra at hagreiða sild. Út móti miðjuni á 19. øld frætta vit bæði um snikkara og dreyara í Havn. Eisini vita vit um unga gentu úr Norðuroyggjum, sum í 1836-37 lærdi til ljósmóður í Keypmannahavn (*Ehlers* 1893).[15] Lagt kann verða aftrat, at *Boeg* (1902) í tilfari sínum til tuberklakanningarnar nevnir fleiri dømi um føroyingar, sum seinast í 18. øld hava verið úti og lært.

Á hesum staði skal bara stutt verða nevnt, at vit eisini vita um fleiri útlendskar rannsóknar- og vísindamenn, sum vitjað hava Føroyar og — summir teirra — hava verið víða um í oyggjunum við fylgi. Í 1709 hin kenda kanningarnevndin (*Kommissionsbetænkningen 1709-10* 1934), ið gav frágreiðing. Í 1789 hin tiltikna Stanley-rannsóknarferðin (*West* 1970, 1975, 1976). Í 1811 bretskur náttúrufrøðingur, ið ferðaðist til Kvívíkar og Vestmanna, og sum kom við bretskum skipi

(kapara við 65 monnum, har hermenn vóru uppiímillum), ið lá á Havnini í eina viku og síðani fór til Vágs (*Nolsøe* 1955). Í 1812 ferðaðust runt í Føroyum bretsku jarðfrøðingarnir Mackenzie og Allan (*Rasmussen & Noe-Nygård* 1969). Teir ungu jarðfrøðingarnir danin J. G. Forchhammer og bretin W. C. Trevelyan vóru at siga allastaðni frá juni til oktober 1821 (*Forchhammer* 1927). Báðir høvdu leingi brævaskifti við prestin Schrøter (sum áður er nevnt). Í 1839 steðgar franska skipið »Recherche« stutt bil í Føroyum, og jarðfrøðingur ferðast runt í Suðurstreymoy, Sandoynni og Nólsoynni (*Rasmussen & Noe-Nygård* 1969).

### *Royndir við fiskiskapi og uttanlandssigling.*

Frá 1810 og til fríhandilin kom stóðst eisini nógv samband við útlendingar av teimum nógvu royndunum, ið gjørdar vórðu við føroyskum fiskiskapi og føroyskari uttanlandssigling. Allar við syndarligum úrsliti. Tilfarið til niðanfyri standandi yvirlit er at siga alt drigið saman úr *Nolsøe* (1955).

1810-11 er skonnartin »Nødvendigheden« (smíðað í Hvalba) við føroyskum skipara og manning í Leith og Hetlandi. Í 1813 fer skonnartin »Færøe« hjá Løbner (smíðað í Nólsoy) til Íslands við føroyskari manning, seinri til Bjørgvinjar, har hon lá allan veturin. Í 1814 er hon í Tróndheimi, men verður í 1815 seld til Keypmannahavnar, hagar hon fór við donskum skipara og nakað av ferðafólki úr Føroyum. Í 1815 fer sluppin »Eyland Færøe« (hitt umbygda vrakið av norsku galeasuni »Håkallen«) til Liverpool við føroyskari manning. Suðuroyar-Dánjal keypti í 1821 í Keypmannahavn skonnartina »Karen Margrethe«, men hon tykist ikki heldur enn sluppin »Jubelfesten« (smíðað í Nólsoy 1817) at hava verið í uttanlandssigling. Í 1824 smíðaði Jóhan Hendrik Weyhe burtur úr skipsbáti av skipi, sum farið var undir Føroyum, inni á Glyvrum sjaluppina »Forsøget«. Manningin var fimm menn ymsastaðni úr Føroyum. Í 1826 vóru teir í Keypmannahavn og seldu skipið. Í staðin fyri keypti hann sluppina »Caroline«. Sum vant gekst illa við fiskiskapinum, og hon varð drigin upp inni á Skálafirði. Í 1824 kom sluppin »Thorshavn« við Suðuroyar-Dánjali sum skipara til Føroya til embætismannaflutnings og vaktarskip, hon royndist sera illa. Danskur skipari kom árið eftir til Føroya at vita, um ikki kundi bøtast um henda vánaliga siglara. Í 1837 varð hon seld til kongliga handilin og fór á land í 1847. 1837-39 fer skonnartin »Nolsøe« (smíðað av nólsoyingum í Havn í 1836) tríggjar ferðir til Hetlands í farmasigling við føroyskari manning. Í 1839 fóru Jóhan Hendrik Weyhe og tríggir syðuroyingar til Grimstad í Noregi eftir deksbátinum »Tverå«, sum partafelag á Tvøroyri hevði latið smíða har. Hann tykist ikki hava gjørt nakra uttanlandsferð, til hann í 1844 varð seldur til Noregs. Hvørki sluppin »Ebenezer« (smíðað í Havn 1838-39) ella »Rojndin« (umbygdur seksæringur úr Porkeri u. l. 1846) hjá Mikkjali í Kristnastovu hava verið í útlondum. — Tí at tað hevur týdning at vita, skal bara verða nevnt her, at í 1844 var spanskt skip á Havnini.

Sama ár eisini norsk jakt úr Christianssund, fermd við borðviði og nævur. Hon fór nakað seinri til Dals, suður til Vágs og síðani á Tvøroyri. Í 1844-46 eru danskar fiskiroyndir undir Føroyum. Tær vóru latnar íslendskum keypmanni upp í hendur, og fiskin uppi á landi skuldi annar, fyrrverandi íslendskur keypmaður virka. Fyrsta árið var bara eitt skip, tað hevði danskan skipara, og manningin var 12 danir umframt fimm føroyingar. Annað árið vóru trý skip og, umframt danir, fjúrtan føroyingar við. Triðja árið vóru aftur trý skip, men talið á føroyingum sæst ikki. Hetta árið var eitt av skipunum í Liverpool eftir salti. — Í 1844 kemur norskt fiskiskip (»Forsøget« úr Kragerø) á Havnina. So við og við mynstraðu fimm føroyingar við tí. Helst royndu teir ikki undir Føroyum. — 1845-48 fekk A. W. Skibsted loyvi til at reiða út eitt fiskiskip við teirri treyt, at føroyingar vóru við. Hann hevði lýsismeltarí á Rundingi. 1846 hevði hann fýra skip, í 1847 og 1848 aftur bara eitt. Ikki sæst, hvussu nógvir føroyingar vóru við skipum hansara. Í 1847 keypa tveir eiðismenn jaktina »Neptunus« í Keypmannahavn og hava fyrsta árið danskan skipara. Teir keyptu fisk frá útróðrarbátum. Í 1849 fóru teir til Hetlands at selja, haðani til Nykøbing Sj. Í 1850 fara teir til Hull við hvala- og kríatúrbeinum, haðani til Altona og um Hamborg til Keypmannahavnar, har teir dvaldust leingi. Aftur í 1851 fara teir til Keypmannahavnar; har lógu teir leingi, áðrenn teir um Mandal og Lerwick koma heim aftur. Í 1852 eru teir aftur í Hull við beinum, høvdu ferðafólk við, og á vegnum upp vóru teir inni í Leith og Scalloway. Í 1853 fóru teir til Keypmannahavnar, har jaktin varð seld. — Sluppin »Håbet« (smíðað í Nólsoy) seldi í 1848 klippfisk til norskan skipara, ið lá á Havnini um heystið. Í 1850 fóru teir til Hetlands. Í 1856 sleipaði ensk slupp hana inn á Trongisvágsfjørð, í 1858 fór hon av Hvalba til Hetlands við fiski. Í 1848 keypti kongligi handilin jaktina »Fortunu« í Keypmannahavn. Hon kom við donskum skipara, sum búsettist í Havn, og trimum donskum sjómonnum, sum fóru niður aftur. Um veturin sigldi hon til Hetlands við posti. Manningin lá um sjey, og gjøgnum árini síggjast, ið hvussu er, tíggju ymiskir føroyingar at hava siglt við henni.

H. 9. juni 1852 vitjar fyrsta guvuskipið Føroyar, danska skrúvuskipið »Thor« (*Færingetidende* 1852).

*Niðurløga.*

Royna vit nú at enda heilt stutt at taka samanum aftur tað, ið drigið er saman til hesa grein, verður úrslit okkara á leið hetta. Føroyar hava ongantíð — samanbornar við onnur lond — uttan kanska í seinru helvt av 17. og nakað inn í 18. øld verið tað avbyrgda samfelag, ið vanliga verður sagt og skrivað. Vit mugu hava í huga, at landsbygdarfólk í farnum øldum struku ikki landa millum sum nú. Mark var eisini fyri, hvussu nógv samband ein fólkabólkur, ið

taldi 3-4000 sálir, kravdi til handilsskap sín. At siga alt regluligt samband hevur til 1620 verið við Bjørgvin. Sambandið var nógv. Og líkt er til, at føroyingar sjálvir til seinast í 16. øld hava uppihildið tað mesta av hesi sigling. Hvussu nógvan týdning, ið sambandið við Bretland, vesturtýsku býirnar og Háland hevur havt í 14. øld og 15. øld, er enn ilt at meta um. Men slíkt samband hevur verið og var móti endanum á 15. øld munandi við vesturtýsku býirnar og við Háland. Danir eru meira og meira komnir uppí, til Keypmannahavn í 1620 og alla tíðina úteftir verður miðdepilin.

Sjórænarar vita vit um frá 16. og eisini 17. øld. Men stórvegis týdning fyri tað samband, ið vit her hugsa um, hava teir ikki havt. Fremmandir fiskimenn hava javnan verið undir Føroyum. Skotskir og kanska eisini franskir, ið hvussu er frá seinru helvt av 16. øld. Hálendingar eisini, ið hvussu er frá seinasta triðingi av 17. øld. Stak nógv samband var tá við fólk uppi á landi. Eisini er líkt til, at føroyingar hava fiskað við summun av hesum fremmandu skipunum. Dømi um hetta eru bæði frá seinast í 16. og frá 18. øld, og teir gjørdu nógv av tí í 19. øld, serliga við hetlendingum og skotum. Seinast í 18. øld vóru týsk skip undir Føroyum, og eisini her vóru føroyingar við. Fyrra partin av 19. øld vóru nógv fronsk fiskiskip undir Føroyum, umframt belgisk og sjálvandi bretsk skip. Stórhvalaveiðan (serliga bretar og hálendingar) hevur valla borið nógv samband við sær.

Sera nógv og uttan iva eisini inniligt samband hevur verið við loynihandilsmenn (týskarar seinast í 16. øld, men frá fyrra parti av 17. øld eisini bretar og hálendingar, umframt danir og norðmenn). Serliga við hálendingar var sambandið regluligt alla seinru helvt av 17. og fyrru helvt av 18. øld — ta tíðina, tá ið føroyingar annars kunnu sigast at hava verið innistongdir. Loynihandilin hevur staðið við, ja, vaks í stórum heilt upp ímóti fríhandilstíðini. 1768-88 stendst av Rybergs handli í Havn heilt nógv samband við fremmandar (danir, bretar, amerikumenn umframt aðrar). — Stutt eftir 1600 og nakað úteftir vóru donsk-norsk herskip í Føroyum mest sum á hvørjum ári, og helst meta vit ógvuliga skeivt, hevur ikki inniligt samband verið við manningar teirra. Eisini fremmand herskip sløddust um Føroyar í 17. øld og seinri, bæði hálendingar, fransar og bretar. Sørt samband hevur heldur ikki verið við fremmandar av Havnar skansa.

Líkt er til, at einstakir føroyingar hava siglt í langfarasigling longu um miðjuna á 16. øld, og teir vuksu í tali úteftir. Skipbrot elvdi av og á, at fremmand fólk, ofta í hópatali, steðgaðu leingi í Føroyum bæði í 17. og 18. øld.

Dømi um, at føroyingar uttan serlig ørindi hava ferðast til útlond, eru sera rár. Men frá 16. øld flytur ikki lítið av fólki bæði til Føroya og aftur og fram. Tað kundi vera fútar, tað hægra starvsfólkið við handilin, prestar, læknar, jarðaránarar ella umboðsmenn teirra. At fólk giftust til Føroya var ikki so sjáldsamt, fyrst úr Noregi, síðani úr Danmark. Bæði konufólk og mannfólk tæntu úti frá fyrra parti av 16. øld. Dømi eru um skúlagongd uttanlands, fyrst í Bjørgvin, síðani í Keypmannahavn. Onkur var úti og lærdi handaverk longu í 17. øld. Í seinru helvt av 18. øld vóru fremmandir kolamenn í Føroyum, og bæði í 18. og 19. øld fleiri rannsóknarferðir. Í fyrru helvt av 19. øld var ikki lítið samband við fremmandar av royndum við fiskiskapi og í uttanlandssigling, har summir føroyingar komu rættiliga víða við skipum, ið teir sjálvir áttu.

## VIÐMERKINGAR

[1]) Orðið *Hansa* sigst vera av finskari rót (*kansak*) og merkir skipað lið ella skipaður flokkur, t. e. samgonga (*Pagel* 1965). Smbr. tó *Knut och Aulis Cannelin, Lauri Hirvensalo, Nils Hedlund:* Finsk-svensk Ordbok. Svenska Bokforlaget. Stockholm 1968.

[2]) Eingin munur verður í hesi grein gjørdur á orðunum Háland/Nederland og hálendskur/nederlendskur.

[3]) Tá ið so nógv verður gjørt burtur úr hesum her, er tað eisini tí, at tað hevur stóran týdning fyri hugleiðingar, sum hoyra ikki upp í hesa grein. Syfilis var farið at ganga í Bjørgvin í 1518.

[4]) Mær tykir, tað hevði verið av størsta týdningi, høvdu føroyskir søgumenn av nýggjum kannað og endurskoðað alt tíðarskeiðið frá 12. øld og fram til 1619. Henda tíðin nýttist ikki at verið so kám og ógreið, vórðu allar heimildir troyttar av nýggjum.

[5]) Í Írlandi var ómetaliga ófriðarligt í 14.-17. øld, eitt javnt stríð við onglendingar, dráp og kúgan av írum, til Cromwell í 1649 setti jarnhælin á land og fólk. Írar munnu tá hava herjað um Onglands strendur og tá eisini borið við Føroyar. Men hetta er bara giting. *Zachariasen* (1959-61, 270. bls.) nevnir máliskuna um, at tá ið veraldar endi verður, skulu skotar og írar búgva heilt niðan undir Varða. — Sjálvur minnist eg frá barnaárum mínum, at tey á Sandi, men eisini í

Suðuroy, plagdu at taka til, at »tá ið fimm (talið kundi skifta) føroyingar skuldu til at skrykkja hømiliurótina upp úr jørðini, skuldu írar og turkar ráða í Føroyum«. Minnist ikki at hava rakt við hesa málisku í bókmentunum. Men *Klæmint Poulsen* á Skarvanesi hevur sagt mær, at hann hevur skrivað upp: »Móti síðstu tíð skulu sjey mans vera um hømiliuna«.

6) Nakar løgfrøðiligur skilnaður millum sjórænara, kapara (privateer) og freebooter verður ikki gjørdur í hesi grein.

7) Viðv. *flagh:* Í *The Scottish Nat. Dict.*, vol. IV, Edinb. 1956, 95. bls. hevur *flag* e. *flaag* nógvar merkingar, eitt nú: A large, clumsy, slovenly woman ... an abusive term for a woman, ca. 1500, of uncertain origin. (Víst verður til *Jakob Jakobsen:* Etymologisk Ordbog over Det norrøne sprog på Shetland. Kbhvn. 1921. Har stendur á 170. bls. *flag*[3] s. 1) uordentligt og sjusket kvindfolk 2) stor og svær kvinde, stor og klodset kvinde). *Chambers's Scots Dictionary.* London 1968, 177. bls. hevur fyri *flag:* a contemptuous name for a woman, a slut.

Viðv. *rijlle (rylle)* er ilt hjá honum, ið er ikki málfrøðingur, at greina spurningin. Tó skal hetta verða nevnt: Í *The Scottish Nat. Dict.*, vol. VII, Edinb. 1968, er at finna á 511. bls.: *Ruil:* An awkward female romp ... origin somewhat doubtful. — The word is also found in n. Engl. dial. as *rool*, *reul*, to behave in an unruly manner, an unruly person, a disturbance, and may poss. be a reduced form of *revel* or phs. Raivel q.v. — Í *Engl. Dialect Dict.*, *V*, Oxford 1970, standa á 179. bls. *Ruil*, Ruiller (hetta sniðið í Hetlandi og Orknoyum), *Roiler*, á 92. bls. Reul(e) ... *ruil* sum s.: An unruly person or animal, a rude, unmannerly clown, a romp, fidget. — *Jakobsen* (1921) hevur í áðurnevndi orðabók síni bæði *roil*, *roll* (uordentligt og sjusket ting o. s. frv.), og, umframt fleiri onnur lík orð, eisini *røll* s.: meget stor el. kluntet (rundskuldret) person, mand el. kvinde ... måske et *ryvl = *ruvl ... umframt aðrar niðrandi merkingar. Hetta má so verða latið málfrøðingum upp í hendur at greiða — eisini um nakað samband kann vera við *Rílagjógv*, sum gjáarmenn hava til ýti á Viðoynni (hetta havi eg frá Chr. Matras, professara).

8) *Ordbog over Det Danske Sprog I*, Kbhvn. 1919, 991. bls.: *Baadsmand* — glda. Botzmanz strædhe — lånt fra glholl. bootsman 1) foræld.: en af mandskabet i en båd, besætningen på et skib, matros.

9) *Ordbog over Det Danske Sprog* 27, Kbhvn. 1954, 907. bls.: *Værelse* — det at befinde sig, opholde sig ell. dvæle på et sted, især for længerer tid; ophold.

10) *hokari* (e. hooker, da. hukkert) var flatbotnað handilsskip, vanliga við tveimum stuttum mastrum.

11) *kuff* (e. kuff, da. kuf), upprunaliga hálendskt orð fyri minni, vanliga flatbotnað skip við rundum stavnum. Reiðið sum á galeasu.

12) *Galiot* er nú burturoldað orð fyri tað skip, teir nú rópa galeasa. *Galeasa* (ital.) er lítið, tveymastrað seglskip við skonnartreiði.

13) Í *Tillæg til Liber Bergensis Capituli*, stendur á 479. bls.: »... Claus Grøn, kongelig Foged på Færøerne, og Niels Helgesen, *Skipper på samme øer«*. Hetta er h. 24. apríl 1567. Hvussu nógv, ið man liggja í »på«, dugi eg ikki at meta um.

[14]) Yvirlitið hjá *Øssurssyni* (1963) hevur tíverri ongar upplýsingar um tjóðskap prestanna. Tí ber ikki til beinleiðis við tí sum heimild at greiða henda spurning.

[15]) Hetta verður nevnt, tí at tað hevur týdning í øðrum sambandi. Ljósmóðurviðurskiftini vóru vánalig. Óvanligt var, at tær høvdu lært burturi.

## SUMMARY

With a view to nosographical studies a brief survey is attempted concerning the intercourse of the Faroese with foreigners in the period 1273-1856. Founded on critical studies of literature, one is compelled to assume that the Faroese themselves maintained the principal part of the maritime contact until the end of the 16th century. Up til 1619 the all-predominant part of the legitimate trade went via Norway (Bergen), from 1620 to 1856 via Copenhagen. The extent of trade connections with the British Isles and with Hamburg (Bremen) and Holland in the 14th and 15th centuries is as yet undetermined. However, towards the end of the 15th century a lively commercial connection existed with the above mentioned German cities and Holland. The myth of the Faroe Islands as a highly isolated community can hardly be sustained, perhaps with the exception of the second half of the 17th and part of the beginning of the 18th centuries.

Besides the legitimate trade connections there have been a multitude of other contacts with foreigners.

Pirates attacked the Faroe Islands in the 16th and 17th centuries, and later also privateers and freebooters, but any substantial communication with these intruders hardly existed. Foreign fishermen have frequently fished near the Faroes. Scotchmen and presumably also Frenchmen, at any rate during the latter half of the 16th century, and Dutchmen from the latter third of the 17th century. These foreigners have had close intercourse with the population, and the Faroese themselves, no doubt, fished aboard some of the foreign vessels. By the end of the 18th century some German boats worked near the Faroes, also with Faroese people aboard. During the 1st half of the 19th century numerous foreign ships fished near the Faroes, as well British, French as Belgian.

Whaling, seemingly, did not bring about any considerable communication.

Smuggling did bring about close contact (with Germans at the end of the 16th century, and from the first half of the 17th century also with British and Dutch besides Danes and Norwegians).

The connection with Holland was particularly frequent and regular during the 17th and 1st half of the 18th centuries. Smuggling increased until 1856. Transit trade (England/America) in Tórshavn 1768-88 brought about close contact with foreigners. During the 17th century there were frequent visits by Danish/Norwegian warships, and at that time and later by Dutch, French and British naval vessels. After 1580 foreign officers were in command of the fortress of Tórshavn.

Since the middle of the 16th century several Faroese have been sailing aboard foreign trade ships, often overseas, and have later returned home. During the 17th and 18th centuries shipwreck occasionally caused considerable numbers of foreigners to remain for longer periods here and there in the Faroe Islands.

Tourist journeys were rare, but from the 16th century onwards several foreigners immigrated, and many officials travelled to and from the Islands (bailiffs, civil servants, higher trade employees, clergymen, doctors, and foreign landowners). A number of visitors, Norwegian as well as Danish, were married on the Islands. Young Faroese men and women went into service for a term of years in other countries. Some attended schools or institutes of higher education. Before 1620 all this took place in Norway, later in Denmark. As early as the 17th century craftsmen learned their trade in other countries. During the second half of the 18th century a few foreign coal miners worked in the Faroes. Several scientific expeditions to the Faroes took place both in the 18th and 19th centuries. A considerable contact with foreigners existed during the first half of the 19th century through fishing experiments and foreign trade on small Faroese vessels.

## BÓKMENTIR


1. *Andersen, N.:* Færøerne 1600-1709. Kbhvn. 1895.
2. *Beenhakker, A. J.:* Hállendingar í Føroyum. Mondul *5* (1): 3, *5* (2): 3, 1979 og *6* (1): 3, 1980.
3. *Boeg, A.:* Et epidemiologisk Bidrag til Lungeftisens Ætiologi. Kbhvn. 1902.
4. *Bruns, F.:* Die Lübecker Bergenfahrer und ihre Chronistik. Hansische Geschichtsquellen, neue Folge, Band II, Berlin 1900.
5. *Carøe, K.:* Landkirurger og Fysici på Færøerne 1584-1916. Personalhistorisk Tidsskrift 7. Rk., 2. Bd.: 47, 1917.
6. Correspondance *J. H. Schrøter & others* to Sir W. C. Trevelyan 1831-65. British Museum: Add: 29,718/9. Óprentað, endurrit á Fróðskaparsetrinum.
7. *Cortemünde:* Mondul *6* (1): 9, 1980.
8. *Dahl, S.:* (í Froðbiar sókn, 339. bls. í) Trap Danmark. 5. Udg. Færøerne, Bd. XIII. Kbhvn. 1968.
9. *Dahl, S.:* Brøv til høv., dagf. 5.8 og 25.8.1980.
10. *Debes, L. J.:* Færoæ et Færoa Reserata. Kiøbenhafn 1673.
11. *Degn, A.:* Oversigt over Fiskeriet og Monopolhandelen på Færøerne 1709-1856. Thorshavn 1929.
12. *Degn, A.:* Færøske Kongsbønder. Thorshavn 1945.
13. *Den kongelige enehandel på Færøerne 1709-1855,* Rigsarkivet. 1. Afd. Marts 1980.
14. *Ehlers, E.:* Om den såkaldte »Kunøske Spedalskhed«. Hospitalstidende *36:* 4. R., 1. Bd.: 1084, 1893.
15. *Enni, J.:* Hargarbrøðurnir. Mondul *5* (2): 7, 1979.

16. *Forchhammer, J. G.:* Rejse til Færøerne. Dagbog 28. april-21. aug. og 23. aug.-21. sept. 1821. Udg. af Ad. Clément. Kbhvn. 1927.
17. *Friis, Peder Claussøn:* Samlede skrifter. Udg. for den norske historiske Forening af Dr. Gustav Storm. Kristiania 1881.
18. *Færøernes Kortlægning.* En historisk fremstilling af N. E. Nørlund. Geodætisk Instituts Publikationer VI. Kbhvn. 1944.
19. *Færingetidende* nr. 5, 19. juni 1852.
20. *Graba, C. J.:* Tagebuch geführt auf einer Reise nach Färö im Jahre 1828. Hamburg 1830.
21. *Hansen, S.:* Havið og vit. 1. partur. Norðoyggja skipa- og handilssøga. Klaksvík 1960.
22. *Hoekema, T.:* Um Frísar, Føroyingar og Frísalandsfólkini. Fróðskaparrit *22:* 66, 1974.
23. *Jacobsen, H.:* Meistar Júst og loytnant Kruuse. Varðin *39:* 15, 1969.
24. *Jacobsen, J.:* Absalon Pederssøn Beyer. Útiseti. Árbók Føroyingafelags VII: 7, 1952.
25. *Jakobsen, J.:* Færøsk Sagnhistorie. Torshavn 1904.
26. *Jakobsen, J.:* Poul Nolsøe, Lívssøga og irkingar. Tórshavn 1912.
27. *Jakobsen, J.:* Sagnir og ævintýr I. Tórshavn 1925.
28. *Joensen, E.: Tingbókin* 1615-54. Tórshavn 1953.
29. *Joensen, E.:* Løgtings- og Vártingsbókin 1655-66. Tórshavn 1958.
30. *Joensen, H. D.:* Fuglamyndirnar eftir Díðrik á Skarvanesi. Fróðskaparrit *18:* 275, 1970.
31. *Joensen, J. K., A. Mortensen & P. Petersen:* Føroyar undir fríum handli í 100 ár. Tórshavn 1955.
32. *Jørgensen, F.:* Anthropologiske Undersögelser fra Færøerne. Kbhvn. 1902.
33. *Kommissionsbetænkningen* 1709-10 ang. Færøernes Tilstand ved Kongens Overtagelse af Enehandelen på Færøerne. Thorshavn 1934.
34. *Niclasen, P.:* Skip, ið fórust. Varðin *4:* 3, 1924.
35. *Nolsøe, P. J.:* Føroya Siglingarsøga I. Tórshavn 1955.
36. *Ólafsson, Jón:* J. O.s Oplevelser som Bøsseskytte under Christian IV. Nedskrevne af Ham selv. I Oversættelse ved S. Bløndal. Kbhvn. 1905.
37. *Pagel, K.:* Die Hanse. 4. Auflage mit 179 Abbildungen. Braunschweig 1965.
38. *Pederssøn, Absalon:* Norges Beskrivelse. Norske Magasin I Bd: 67, Christiania 1858.
39. *Pederssøn, Absalon:* Liber Bergensis Capituli (Absalon Pederssøns Kapitelsbog 1552-1572). Norske Magasin Bd. I (2): 181, Christiania 1860.
40. *Petersen, P.:* Føroyar í søguni I. Funningi 1974.
41. *Rasmussen, J. & A. Noe-Nygård:* Beskrivelse til geologisk kort over Færøerne. Kbhvn. 1969.
42. *Rasmussen, R. K.:* Gomul føroysk heimaráð. Ann. Soc. scient. Fær. Suppl. III. Tórshavn 1959.
43. *Ravnsfjall, J.:* 1667 — tað minniliga árið. Mondul *5* (2): 9, 1979.

44. *Ryggi, Mikkjal á:* Stórhvalur og stórhvalaveiði. Varðin VII: 117, 1927.
45. *Ræstad, A.:* Kongens Strømme. Kristiania 1912.
46. *Schreiner, J.:* Hanseatene og Norge i det 16. århundre. Oslo 1941.
47. *Svabo, J. Chr.:* Indberetninger fra en Reise i Færøe 1881 og 1782. Kbhvn. 1959.
48. *West, J. F.:* The English Letters of Pastor Schrøter. Fróðskaparrit *18:* 17, 1970.
49. *West, J. F.:* The Journals of the Stanley Expedition to the Faroe Islands and Iceland in 1789. 1.-3. bd., Tórshavn 1970, 1975, 1976.
50. *West, J. F.:* Smugling í 1740. Mondul *5* (3): 14, 1979.
51. *Wolff, Jens Lauritssøn:* Norrigia Illustrata eller Norriges med sine underliggende Lande oc Øer/kort oc sandfærdige Beskriffvelse etc. Prentet i Kiøbenhafn 1651.
52. *Zachariasen, L.:* Føroyar sum rættarsamfelag 1539-1655. Ann. Soc. Scient. Fær. Suppl. IV. Tórshavn 1959-61.
53. *Øssursson, J.:* Uppískoyti. 25-ára minnisrit. Hitt føroyska studentafelagið í Keypmannahavn. Kphvn. 1935.
54. *Øssursson, J.:* Føroya biskupa-, prósta og prestatal. Tórshavn 1963.
55. *Østved, E.:* Mogens Heinessøn. Et Ibsenskuespil som aldri blev skrevet. Skien 1969.